| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**21. juni 2007** | Blað nr.: **8998**<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato: 21. juni 2007**
**Stað: Býráðssalurin**
**Málsnr: 93/07-116/07**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Marin Katrina Frýdal
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

J. nr. 2004002360–7 SG

**LUTTÓK EISINI:**
Ingibjørg Berg
Bjørgfríð Ludvig
Edvard í Skorðini Joensen
Høgni Joensen
Jákup Simonsen

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagskránna.**

**94/07** **2007-1719**

**Serstøk byggisamtykt fyri ”Útstykking 200” eystan fyri Karlamagnusarbreyt.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
”Útstykking 200”, eystan fyri Karlamagnusarbreyt og norðan fyri Hoyvíkar skúla, er uml. 22.000 fermetrar til støddar. Henda útstykking liggur í einum A3 øki, sum sambært byggisamtyktini, kann nýtast til bústaðir.

63 grundøki, ið eru 200 fermetrar til støddar. Samlaða grundøkið er 300 fermetrar fyri hvørt, har uml. 100 fermetrar verða lagdir til fríøki, sokallað Tún. Túnini eru 3 í tali, og liggja hesi við atgongd frá Karlamagnusarbreyt.

Atgongd verður til alla útstykkingina frá Karlamagnusarbreyt. Í uppskotinum eru 3 atkomur. Framvið útstykkingini á atkomusíðuni móti Karlamagnusarbreyt, verður ein býlingsvegur, ið kann nýtast, um tørvur skuldi verið á tí. Hetta kann t.d. verða galdandi um ein av atkomuvegunum er ringur at koyra eftir í t.d. hálku ella av aðrari orsøk.

Atkomuvegurin leiðir bilar og fólk inn til Túnini, ið verða savnandi fyri býlingin. Frá Túnunum verða minni húsavegir inn til tey einstøku húsini. Øll felagsparkering, renovatión, møguliga postskipan, bilavask o.a. og spæl verður miðsavnað um Túnini.

Til hvørt Túnið hoyra uml. 20 hús. Húsini standa á einum grundøki, ið eru uml. 200 fermetrar til støddar. Húsini eru 8,75 x 6,25 metrar til støddar, úthúsini/bilhúsini eru 5,50 x 3,75 metrar til støddar. Planering og sokklar til húsini og úthúsini/bilhúsini verða staðsettir av TK.

Staðsetingin av húsum og úthúsum/bilhúsum verður samtykt í eini serstakari byggi-samtykt fyri ”Útstykkingina 200”, eystan fyri Karlamagnusarbreyt

Nú er eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri ”Útstykking 200” gjørt.

Serstaka byggisamtyktin ásetur treytir fyri bygging v.m. og nágreinar ymisk viðurskifti

í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at uppskotið um serstaka byggisamtykt fyri "Útstykking 200" verður góðkend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juni. 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

95/07 **2007-1793**

**Dispositiónsuppskot: Nevndarviðgerð - Gongubrúgv frá Karlamagnusar-breyt til Stórutjørn yvir um "Sambindingarvegur Klingran - Løgmannabreyt við íbinding í landsveg"**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Umsitingin hevur, saman við ráðgevanum Sp/f HMP-Consult/Arkitektar 99, latið gjørt uppskot til gongubrúgv frá Karlamagnusarbreyt og yvir um Sambindingarvegin, sí skjal nr. 2007-1359/1. Ráðgevin hevur gjørt eina kostnaðarmeting, sí skjal nr. 2.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting áljóðandi kr. 3. mió. íroknað projektering, eftirlit, óvæntaðar útreiðslur og mvg, sí skjal nr. 2007-1791/2.

**Tilmæli:**
Nú arbeiðið er í gongd í sambandi við Sambindingarvegin, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til detailprojektering av gongubrúgv fyri at kunna fyrireika landfestið vestaru megin sambindingarvegin

Mælt verður eisini til at játta kr. 300.000,- til detailprojekt av konto fyri íløgur 2007 fyri vegir.

**Tekniska nevnd 7. juni 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og tekniska stjóranum.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**96/07** **2007-1598**

**Tyrvingarplássið í Húsahaganum: Útbygging**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Seinasta útbygging av tyrvingarplássinum í Húsahaganum, sum varð tikin í nýtslu á heysti 2006, er við at fyllast upp. Nú verður mett, at pláss er eftir til umleið ¾ ár, í mesta lagi 1 ár (formaðurin í húsahaganum metir nú ¾ ár, ráðgevi roknaði út frá uppmátingum 1,5 ár frá januar 2007).

Tað er tí alneyðugt at hava annað øki tøkt inna ½ - ¾ ár, fyri at burturkastskipanin kann halda áfram. Nýtt tyrvingarpláss á Glyvursnesi verður ikki tøkt innan ta tíð, so tí er neyðugt at byggja út í Húsahaganum.

Kommunala Brennistøðin hevur latið gjørt eitt projektuppskot av eini møguligari útbygging, herundir kostnaðarmeting og nøgdarútrokningar, sí hjálagt tilfar. Kostnaðurin verður mettur til umleið kr. 2,2 mió. haraftrat kemur ókent, eftirlit og mvg, so samlaði tørvurin er umleið kr. 3,0 mió. Hetta er ein útbygging, sum kann geva umleið 1-2 ár eyka.

Trupulleikar eru eisini á tyrvingarplássinum av teirri stóru nøgd av betongevju frá blandistøðunum. Nøgdirnar eru ov stórar til at tað kann verða í vanligu tyrvingini. Tá avgjørt varð at koyra hetta tilfarið í vanligu tyrvingina, tí trupulleikar vóru á moldplássinum við betongvatni, ið rann frá, varð upplýst frá blandistøðini, at talan fór at verða um umleið 25 m³ um mánaðin, men nøgdirnar vísa seg at vera nógv størri, tí nú er talan um umleið 25-30 m³ um vikuna. Tilfarið er vátt og hevur einki berievni. Loysn má tí eisini finnast til betongevju beinanvegin. Ein fyribils loysn kundi verið at útvega 2 goymslutangar sum teir, ið ætlanin er at brúka til rottangaevju, har betongevja kann vatnrenna og torna, síðani kann (vónandi turkaða) betongevjan leggjast út á moldøkið, og tilfar leggjast útyvir. Kostnaðurin fyri hvønn tanga er umleið kr. 0,3 mió.

**Tilmæli:**
Leiðarin á KB mælir til, at nevnda útbygging verður framd beinanvegin, og at kostnaðurin, mettur til kr 3,6 mió, verður fíggjaður av íløgujáttanini fyri 2007 til nýtt tyrvingarpláss.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juni. 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 7. juni 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við samtyktini hjá byggi- og býarskipanarnevndini frá 4. juni 2007.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**97/07** **2005-3141**

**Endurskoðan av bussleiðini.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
P/F Mouritsens Bussar hava í skrivi, dagf. 17. november 2005, bjóða sær til at víðka um bussleiðina. Greitt verður frá uppskotinum, sum tekur støði í at:

1. Víðka verandi koyring á leið 1, 2 og 3 til tvær ferðir um tíman á kvøldi gerandisdagar umframt at bussarnir koyra eina ferð um tíman um kvøldið leygar- og sunnudag.

2. Uppskotið fevnir eisini um nýggja koyring fyri at økja um títtleikan á leið 1, 2 og 3 frá tvær ferðir til tríggjar ferðir um tíman í dagtímunum gerandisdagar.

**Fíggjarlig viðurskifti.**

1. Víðka verandi koyring á leið 1, 2 og 3.
   Kostnaðurin fyri hesa koyring er álj. kr. kr. 318,- pr. tíma ella íalt kr. 1.962.378,- árliga (u/mvg) ella **2.085.026,03** árliga íroknað 6,25% mvg.

2. Nýggja koyring
   Kostnaðurin fyri hesa koyring er álj. kr. 519,- pr. tíma ella íalt kr. 3.970.350,- árliga (u/mvg) ella **4.218.496,88** árliga íroknað 6,25% mvg. Orsøkin til henda einleikaprís er at neyðugt er at útvega 3 nýggjar bussar til endamálið, vísandi til at verandi busspark ikki nøktar tørvin. Einleikaprísurin er harumframt gundaður á at bussarnir verða fult avskrivaðir í sáttmálaskeiðnum, ið eftir er, tvs. til tann 1. februar 2010.

Nýggj koyring – alternativt uppskot.
Um Tórshavnar kommuna yvirtekur teir 3 bussarnar eftir lokið sáttmálaskeið tann 1. februar 2010 fyri kr. 3.300.000,- (sum er 8/12 av keypsprísinum áljóðandi 1.650.000,- tá bussurin verður avskrivaður á 12 ár). Hetta merkir at árliga gjaldið fyri nýggju koyringina lækkar við kr. 818.550 u.mvg (ella kr. 869.709,38 íroknað 6,25% mvg). Soleiðis verður kostnaðurin fyri hesa koyring álj. kr. 412,- pr. tíma ella íalt kr. 3.151.800 árliga (u/mvg) ella **3.348.787,50** árliga íroknað 6,25% mvg.

Støða skal takast til innkomið tilboð frá P/F M.B. Bussum og um farast skal undir at endurskoða bussleiðina.

**Tilmæli:**
Vísandi til at ynski er at fáa bussleiðina at koyra eftir nýggju skipanini til 1. juli 2006 mælir býarverkfrøðingurin til, at sett verður fólk av at taka sær av hesi uppgávu beinanvegin, soleiðis at ítøkiligt uppskot verður at leggja fyri nevndina aftur í mars 2006. Býarverkfrøðingurin mælir harumframt til at

1. tikið verður av tilboðnum hjá P/F M.B. Bussum um víðkan av verandi koyring á leið 1, 2 og 3 álj. kr. 2.085.026,03 árliga íroknað 6,25% mvg.
2. tikið verður undir við alternativa tilboðnum um nýggja koyring kr. 3.348.787,50 árliga íroknað 6,25% mvg.

**Tekniska nevnd 8. desember 2005:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Jógvan Arge, samtykti at endurskoða bussleiðina beinanvegin, soleiðis at ítøkiligt uppskot verður at leggja fyri nevndina aftur í mars 2006. Arbeiðið verður fíggjað av konto 03-2070.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við uppskotinum, vísandi til at ov fáar klagur eru um bussleiðina og at hetta er somikið kostnaðarmikið, at hetta eigur at bjóðast út av nýggjum, tá sáttmálaskeiðið er runnið í 2010.

- Kunnað verður um gongdina í málinum.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 4. mai 2006:** Frank Jacobsen legði fram frágreiðingina frá arbeiðsbólkinum.

Nevndin samtykti, at umsitingin arbeiðir víðari við framlagda uppskotinum um alternativa leið og kostnaðin av hesum at leggja fyri nevndina aftur. Nevndin ynskir, at umsitingin útgreinar kostnað fyri skúlabarnakoyringina í sambandi við víðari viðgerðina av endurskoðanini av bussleiðini.

Umsitingin hevur biðið um tilboð frá báðum arbeiðstakarunum Gundurs Bussum og Mouritsens Bussum. Málið verður lagt fram á fundinum. Tað er ikki eyndast umsitingini at útgreina kostnað fyri skúlabarnakoyringina í sambandi við víðari viðgerðina av endurskoðanini av bussleiðini.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir nevndini til at taka støðu til framløgdu tilboð.

**Tekniska nevnd 26. juni 2006:** Málið umrøtt.

- Marin Katrina Frýdal, formaður í teknisku nevnd, ynskir í sambandi við

endurskoðanina av bussleiðini m.a. at viðgera spurningin um, hvørt tað kundi verið ein gongd leið at innført ókeypis busskoyring, sum lið í strembanini eftir at økja um nýtsluna av bussunum og samstundis at flyta nakað av privatbilferðsluni yvir á kollektivferðsluna.

Heldur enn at víðka verandi bussleið, kundi verði sett í gildi ókeypis busskoyring í fyribils eitt ella tvey ár sum royndartíð, galdandi frá 1. januar 2007. Soleiðis hevði borið til at eggjað borgarunum til at brúka bussarnar, og ikki minst at ala børnini til á ein náttúrligan hátt at brúka bussarnar heldur enn at verða koyrd til og frá skúla, ítrótti, frítíðarvirksemi o. ø.
Ókeypis busskoyring fer at elva fólki til at brúka bussleiðina meira, og næsta stigið eigur at verða at økja um títtleikan, tí tástani kann bussleiðin gerast eitt veruligt alternativ til privatbilin. Ein slík skipað tilgongd kundi verið við til at minka um bilatalið í býnum, og um ta alsamt veksandi ferðsluna í kommununi. Færri tal av bilum fast í býnum um dagarnar hevði somuleiðis bøtt um parkeringsmøguleikarnar.

Um fyrimunir og royndir aðrastaðni verður víst til frágreiðing frá Teknologirådet í Danmark, um "Gratis offentlig transport", har sagt verður m.a.:
"Der er bred enighed blandt sagkyndige om, at der er samfundsøkonomiske fordele at hente ved at flytte en del af privatbilismen over i offentlig transport. Enkelte vurderer endda at samfundet som helhed vil tjene på at gøre den offentlige transport gratis. Ikke i form af et direkte konkret afkast, men udfra en helhedsorienteret og langsigtet samfundsøkonomisk vurdering, hvor de manglende billetindtægter opvejes af en reduktion af udgifter på andre områder.
Ved at reducere privatbilismen reduceres nemlig samtidig de negative afledte effekter og dermed også udgifterne til dem. Det er effekter som ulykker, luftforurening, CO2-udslip/klimaeffekt, ressourceforbrug (olie), støj, trængsel, udbygning og vedligeholdelse af infrastruktur."

Billettmaskinurnar hjá bussleiðini eru avoldaðar og slitnar. Tí stendur ein stór íløga fyri framman til slíka útgerð, um billettskipanin verður varðveitt.

Verður billettskipanin slept, fáa bussførararnir ivaleyst munandi betur stundir til økta kundatænastu og betri ferðslutrygd.

Harumframt skal støða takast til um kommunan skal lata gera faldarar til verandi leiðir.

**Tekniska nevnd 2. november 2006:** Í eini roynd at tálma støðugt vaksandi ferðslu-trýstinum í kommununi og at fáa økt um nýtsluna av Bussleiðini mælir ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Leivur Hansen, býráðnum um fíggjarnevndina til, at verandi busskoyring verður ókeypis fyribils í eitt ár sum royndartíð, galdandi frá 1. januar 2007. Meirkostnaðurin fyri hesa tænastu verður uml. 3,5 mió. kr. og verður heitt á fíggjarnendina um at taka hetta upp í sambandi við 2. viðgerð av uppskotinum um fíggjarætlan fyri 2007.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, tekur ikki støðu til málið vísandi til at einki tilmæli er frá umsitingini og at fíggjarætlanin innan tekniska økið fyri 2007 longu er samtykt av teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Umrøtt og verður tikið uppaftur í.s.v. 2. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2007.

**Fíggjarnevndin 13. november 2006:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, mælir býráðnum til at taka undir við minnilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 16. november 2006:** Atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

- Nú ókeypis busskoyring hevur verið fyrsta ársfjóðring 2007 og staðfest er, at tali á ferðandi er nógv økt, ynskir formaðurin í nevndini, at nevndin tekur støðu til nýtt uppskot um víðkan av bussleiðini. Játtan til víðkan av bussleiðini er ikki sett av á fíggjarætlanini fyri 2007. Umsitingin kemur saman við umboðum frá P/F M.B Bussum at greiða frá uppskotinum.

**Tekniska nevnd 12. apríl 2007:** Umboð fyri P/F Mouritsens Bussum greiddu frá uppskoti og tilboði um víðkan av maskinparkini til bussleiðina í sambandi við møguligan øktan títtleika av túratalinum.
Ein meiriluti, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov, samtykti, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.
Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við málinum vísandi til at ongar kanningar eru gjørdar í umsitingini og heldur seg tískil til galdandi sáttmála.

- Umsitingin hevur saman við granskoðara latið gera eina meting av fyriliggjandi uppskoti og tilboð um ætlaðu víðkanina av maskinparkini til bussleiðina. Umboð frá grannskoðaravirkinum Spekt koma saman við umsitingini at greiða frá.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður undir við tilboðnum frá P/F M.B. Bussum.

**Tekniska nevnd 10. mai 2007:** Ein meiriluti, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal og

Katrin Dahl Jakobsen heitir á umsitingina um at kanna kostnað fyri keyp av brúktum bussum at leggja fyri nevndini til næsta fund.
Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Sjúrður Olsen mæla til at kommunan heldur seg til galdandi sáttmála.

- Umsitingin hevur sambært nevndasamtykt frá 10.mai 2007 kannað kostnað fyri brúktar bussar. Greitt verður frá kanningini.

**Tekniska nevnd 23. mai 2007:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, og Hildur Eyðunsdóttir, samtykti at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.
Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Sjúrður Olsen, heldur seg til samtyktina frá 10. mai 2007.

- Umsitingin hevur arbeitt víðari við málinum sambært nevndarsamtykt frá 23. mai 2007 og leggur fram kostnað fyri nýtslu av brúktum bussum frá MB-Bussum.

Tilmæli kemur til fundin.

**Tekniska nevnd 7. juni 2007:** Ein meiriluti**,** Marin Katrina Frýdal, Leivur Hansen og Katrin Dahl Jakobsen, samtykti at taka undir við tilboðnum frá P/F M.B. Bussum, dagf. 5. juni 2007, álj. kr. 3.873.354,- pr. ár og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Sjúrður Olsen, heldur seg til samtyktina frá 10. mai 2007.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Leivur Hansen og Hildur Eyðunsdóttir, mælir býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

Ein minniluti, Jan Christiansen, mælir býráðnum til at taka undir við minnilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 21. juni 2007:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Jan Christiansen í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Greiddu ikki atkvøðu: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**98/07** **2006-0501**

**Umleggjan av ánni frá keldum undir Gráasteini**

**Lýsing av málinum í stuttum – samandráttur:**
Áin frá keldum undir Gráasteini liggur so at siga meiri óskipað, frá undir Gráasteini umvegis Gerðini til Frælsið og síðani út á sjógv við Álakeri.

Stóri trupulleikin er við "skeivu brúgv" á Landavegnum, beint við SEV-bygningin, har er áin innilokað í einum ø900 mm PVC-røri, sum síðani liggur opin eini 50 metrar og síðani í eitt ø400 mm PVC rør, ið liggur fram við útstykkingini Havragerði og á Teigi. Tá áarføri er, klárar ø400 mm rørið ikki "at svølgja" og førir hetta við sær, at regnvatnið flýtur yvir.

Fyri at fáa betra um hesi viðurskifti, eru 2 møguleikar, annar er, at lagt verður nýggj leiðing eftir Stóragerði umvegis Velbastaðvegin og síðani í ánna undir kirkjugarðinum við Velbastaðvegin.

Henda leiðing er umleið 350 metrar long.

Ein partur av leiðingini kemur í eina privata ogn, matr. nr. 1045a, og tí er neyðugt at taka samráðingar upp við eigaran um neyðug loyvir.

Hin møguleikin er at leggja leiðing fram við útstykkingini Havragerði, við síðuna av verandi ø400 mm leiðing, og síðani í kloakkleiðingina í Bóndaheygi.

Henda leiðing er umleið 250 metrar long.

Kostnaðarmetingin fyri hetta arbeiðið er kr. 1,3 mió. við 6,25% mvg.

Ein partur av leiðingini, uml. 150 metrar, kemur í privatar ognir, matr. nr. 1045a og 1045q, og tí er neyðugt at taka samráðingar upp við eigararnar um neyðug loyvi.

At leggja eina gøtu fram við útstykkingini Havragerði, har nýggja leiðingin er ætlað, er ein loysn í lendisdeildin tekur undir við.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin vísir til mannagongd í sambandi við verkætlan, sum skal fíggjast av konto fyri íløgur og mælir til at ’ fíggjarnevndin viðger ávísing til fígging’ , soleiðis at peningur - uml kr. 150.000,00 - verður settur av til ráðgeva, sum skal gera projekt og kostnaðarmetan at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 4. mai 2006**: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 10. mai 2006:** Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 7. juni 2007:** Nevndin vísir til áður gjørda samtykt frá 4. mai 2006 og beinir málið aftur í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 150.000,00 av íløgum.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**99/07** **2007-1831**

**Innbúgv til skúlastovuna í Hoyvíkar kirkju, serstovur í nýggja skúla og serstovur í gamla skúla.**

Í sambandi við, at skúlin ikki hevur pláss at hýsa øllum næmingunumm næsta skúlaár 2007/2008 er neyðugt at hava eina fyribils skúlastovu í nýggju kirkjuni í Hoyvík. Eisini er neyðugt at innrætta serstovur til autistar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 233.000,00 til innbúgv, sambært tilboð, og at peningurin verður játtaður av konto 90 íløgur hjá skúlum.

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**100/07** **2004-0842**

**Frítíðarskúli og skúli til Hoyvíkar skúla**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Byggideildin hevur fingið til vega dispositiónsuppskot av skúla og frítíðarskúla til 1. og 2. flokk til Hoyvíkar skúla. Skúlin og frítíðarskúlin er 2-sporaður til umleið 96 børn. Hjálagt j. nr. 200400823.

Bygningurin verður tilsamans 710 $m^2$ til støddar.
Grundvíddin verður 410 $m^2$

Í sambandi við mál nr. 2003-0215 - Nýggjur fólkaskúli í Hoyvíkshaganum - hevur mentamálanevndin 3. mars 2004 samtykt at byggja ein skúlabygning við verandi Hoyvíkar skúla, sbrt. støðumynd, dagfest 3. mars 2004, sum skal kunna hýsa yngstu flokkunum og frítíðarskúla, og samtykt at játta kr. 100.000,00 av íløgujáttanini 2004 til gerð av dispositiónsuppskoti at leggja aftur fyri nevndina skjótast gjørligt, og beina málið til byggideildina.

Við einum $m^2$ uppá kr.15.265 verður samlaði kostnaðurin íroknað 6,25% mvg mettur at verða kr. 10.837.903.

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at góðkenna dispositiónsuppskotið við tíðarætlan, dagfest 25. juni 2004. Tað ber til at forcera tíðarætlanina til skúlabyrjan, men tað hevur ein meirkostnað við sær.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mæla til at taka undir við tekniska stjóranum og býararkitektinum

Eisini verður mælt til, at kr. 2.150.000 verða játtaðar av íløguætlanini fyri 2004 og kr. 8.700.000 av íløguætlanini fyri 2005.

**Mentamálanevndin 7. september 2004:** Nevndin samtykti at taka undir tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og deildarleiðaranum í mentamálum og beina málið, um fíggjar-nevndina, í býráðið til samtyktar.

**Fíggjarnevndin 16. september 2004:** Samtykt at leggja málið fyri býráðið.

**Býráðið 23. september 2004:** Atkvøtt varð um tilmælið frá mentamálanevndini 7.

september 2004, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Jan Christiansen, Jákup Suni Joensen, Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Tórfinn Smith, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen. Greiddi ikki atkvøðu: Schumann Hjaltalin og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Jørð- og kloakk arbeiði varð boðið út í desember 2004 sum undirhondsboð. 2 tilboð komu inn, og vóru tey:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Andrias Berg SpF | kr. 614.120,00 uttan MVG |
| 2. | P/f Maskinkoyring | kr. 751.206,00 uttan MVG |

Bygginevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Andrias Berg SpF.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum frá Andrias Berg uppá kr. 652.502,50 við MVG, sum verður tikið av íløgujáttaninum á skúlaøkinum 2004.

**Mentamálanevndin 17. februar 2004:** Selmar Nielsen, arkitektur, greiddi frá projektinum.

Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá Andriasi Berg sp/f uppá kr. 652.502,50 við mvg, sum verður tikið av íløgujáttanini á skúlaøkinum 2004.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2005:** Mikael Viderø, býararkitektur, og Unnie Justinussen, ark., vóru á fundinum og greiddu frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 27. januar 2005**: Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov Beate L. Samuelsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen, Bjarti Mohr og Annika Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Kathrina Frýdal og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Lisitatión av høvuðsarbeiðstøkuni var mánadagin 14. mars 2005. Inn komu 4 tilboð:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Sp/f ÁTS v/ Karstin Vang | kr. 7.190.787,00 |
| 2. | Sp/f Valbjørn Dalsgarð | kr. 7.498.611,00 |

3. Articon kr. 7.982.246,73
4. MT - Højgaard kr. 10.264.129,00

Bygginevndin mælir til at taka av tilboðnum frá sp/f ÁTS, v/ Karstin Vang.
**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og at leggja málið fyri býráðið um fíggjarnevndina. Peningur er játtaður á íløguætlanini á skúlaøkinum 2004 og 2005 (býráðssamtykt 23. sept. 2004).

**Mentamálanevndin 6. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. apríl 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
**Innbúgv til frítíðarskúlan:**
Ætlanin var, at frítíðarskúlin í Stoffalág 60 skuldi lata aftur, og innbúgvið flytast niðan í frítíðarskúlan í Hoyvík, men av tí at frítíðarskúlin í Stoffalág 60 heldur áfram, verður neyðugt at keypa nýtt innbúgv.

**Økið uttanum frítíðarskúlan:**
Arbeiðsbólkurin fyri nýggja barna- og frítíðarskúlan við Hoyvíkar skúla vil við hesum heita á mentamálanevndina um at játta kr. 375.000,00 at gera uttanumøkið við nýggja skúlan.

Uttanumøkið var við í útbjóðingartilfarinum, men tá ið tilboðini komu inn, var tað ov høgt í mun til kostnaðarmetingina. Tí varð hesin partur av veitingini tikin burtur úr.

Fyri at byggja nýggja skúlan varð neyðugt at broyta atkomuviðurskiftini til verandi skúla og Hoyvíkshøllina. Tað er m.a. hetta arbeiði, ið nú skal gerast aftur.

Viðmerkjast skal, at skúlin stendur við høvuðsinnkoyringina til skúlan og dygst við Vegin Langa, har nógv og tung ferðsla er. Neyðugt er tí at hugsa um ferðslutrygdina, og at økið er trygt hjá børnunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at játta kr. 75.000,00 til innbúgv til frítíðarskúlan í Hoyvík og kr. 375.000,00 til økið uttanum frítíðarskúlan av íløgum á barnaansingarøkinum.

**Mentamálanevndin 26. juni 2006:** Unnie Justinussen greiddi frá málinum um økið uttanum frítíðarskúlan, og Frígerð Sundskarð greiddi frá málinum um innbúgv til

frítíðarskúlan í Hoyvík.

Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Sum kunnugt skuldi frítíðarskúlin í Stoffalág 60 lata aftur, og innbúgvið flytast niðan í nýggja frítíðarskúlan í Hoyvík. Av tí at frítíðarskúlin í Stoffalág helt fram at virka, kundi hetta ikki gerast. Í juni 2006 varð søkt um eykajáttan til gardarobu og steintoy á 75,000 kr.

Nú nýggi Frítíðarskúlin í Hoyvík er farin at virka, vísir tað seg, at tørvur er á fleiri pengum til innbúgv, leikur og amboð. Lutvíst tí, at hædd ikki varð tikin fyri hesum í verkætlanini, tí ætlanin var at endurnýta tað sum var í Stoffalág 60, lutvíst tí barnatalið er hækkað úr 90 upp í 117.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at játta kr. 200.000,00 til innbúgv, leikur og amboð til frítíðarskúlan í Hoyvík av íløgum á barnaansingarøkinum.

**Mentamálanevndin 4. oktober 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og leiðaranum fyri barna- og ungdómsdeildina og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 26. oktober 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
**Mál viðvíkjandi nýggjum duri til barnaskúlan í Hoyvík**
Umboð fyri byggideildina greiða frá málinum.

**Tilmæli:**
Neyðugt verður at byggja nýggjan dur og klædnagoymslu til smábarnaskúlan/frítíðar-skúlan í Hoyvíkar skúla.

Vísandi til uppskot frá arkitektinum Selmari Nielsen verður neyðugt at byggja 56 m² uppí verandi skúla.

Bygginevndin mælir mentamálanevndini at góðkenna projektið og at játta kr. 1.193.000 íroknað 6,25 % mvg. Hædd er ikki tikin fyri møguligum prís- og lønarvøkstri.

Bygginevndin mælir somuleiðis til at innheinta tvey undirhondstilboð.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at peningurin, kr. 1.193.000,00, verður játtaður av konto 90, íløgum á skúlaøkinum.

**Mentamálanevndin 10. januar 2007:** Samtykt at taka undir tilmælinum hjá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 1.200.000 av íløgum.

**Býráðið 1. februar 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Tá lisitatónin hevði verið 25.05.2007 vóru tilboðini hesi:

Húsavørðatænastan, kr. 1.253.432,- við 6,25% MVG

Viking Smíð, kr. 1.352.562,- við 6,25% MVG

Bæði feløgini siga seg at kunna gera arbeiðið til skúlaársbyrjan í august 2007, um tey fáa svar áðrenn 1.juni 2007.

Metingin við ráðgeving var kr. 1.193.000 íroknað 6,25 % mvg, sum býráðið samtykti at játta av konto 90, íløgur til skúlaøkið.

Bygginevndin mælir til at taka av tilboðnum hjá Húsavørðatænastuni á kr. 1.253.432,- við 6,25% MVG.

Samlaði kostnaðurin íroknað ráðgeving verður sostatt kr. 1.452.229,- við 6,25% mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fylgja tilmælinum frá bygginevndini og játta munin á metingini og tilboðnum frá Húsavørðatænastuni kr. 252.229,- við 6,25% MVG afturat av konto 90, íløgur til skúlaøkið.

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**101/07** <u>**2007-1832**</u>

<u>**Mál um fyribilshølir til Argja skúla**</u>.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
1. juni 2007 samtykti Tingið uppskot frá landsstýrismanninum í mentamálum um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan. Ein avgerðandi broyting er, at 1.-3. flokkarnir frá skúlaárinum 2007/2008 fáa fleiri tímar.

Flestu skúlar í Tórshavnar kommunu klára at rúma hesi broyting innanfyri verandi bygningskarmar. Undantak frá hesum er Argja skúli, sum seinastu árini hevur havt undirvísing fyri 1. flokkunum seinnapartar, tí pláss ikki er í skúlanum fyri øllum árgangum í vanligari skúlatíð.

Nevnda broyting hevur við sær, at tíðin 1.-3. flokkarnar eru í skúla verður longd við 3 tímum um vikuna. Undirvísingin í 2.-3. flokki endar sostatt seinni fleiri dagar um vikuna, og 1. flokkur noyðist tí eisini at byrja seinni. Royndirnar hjá skúlanum vísa, at hetta als ikki letur seg gera, tí næmingar, ið hava verið í frítíðarskúla størsta partin av degnum, áðrenn teir koma í skúla, eru illa upplagdir og illa fyri at taka ímóti undirvísing.

Mentamáladeildin hevur saman við skúlastjóranum á Argja skúla kannað ymiskar loysnir, og er komin til ta niðurstøðu, at besta loysnin er at seta eina fyribils skúlastovueind upp við posthúsbygningin.

Undirvísingin í Argja skúla er partvíst skipað sum toymisundirvísing, soleiðis at 1.-3. flokkarnir saman við teirra lærarum eru í posthúsbygninginum á Argjum. Við at skapa umstøður við posthúsbygningin er gjørligt at loysa meirtørvin á skúlastovum og samstundis varðveita undirvísingarskipanina í skúlanum. Harafturat kemur, at ein slík loysn kann flytast til annað øki í kommununi at nøkta annan tørv, tá nýggi Argja skúlin er liðugur.

Umsitingin kannar í løtuni, um landsstýrið er sinnað at loyva hesum.

Metti kostnaðurin við innbúgvi íroknað 6,25 % mvg er (fyri undirvísingarhøli 1.550.000 kr. + innbúgv 65.000 kr)

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta fyribils skúlastovur upp við Posthúsbygningin á Argjum treyta av, at landsstýrið gevur loyvi til tess. Mælt verður til at játta 1.615.000 kr. av íløgum á skúlaøkinum.

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá

trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**102/07** **2006-2725**

**Góðkenning av viðtøkunum fyri Eigarafelaganum Kirkjustræti.**

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna uppskotið til viðtøkur.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**103/07** **2001-1314**

**Keyp av 375 m² frá 139a, Hoyvík.**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Í sambandi við útstykkingina á Skarðshjalla, má kommunan keypa 375 m² frá Búnaðarstovuni.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at keypa 375 m² fyri vanligan jarðarprís.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**104/07** **2005-0984**

**Skipan av nýggja heiminum til eldri oman Mattalág.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við skipan av hesum nýggja heiminum til eldri hava samráðingar verið við fyristøðufólkið á Ellis- og umlættingarheiminum, um at heimið verður ein víðkan av búplássunum á Ellisheiminum, soleiðis at raksturin verður so rationellur sum gjørligt.

Kommunan hevur møguleika at keypa ein part av tí innbúgvi, sum er í húsinum, ið eru kvalitetsmøblar við eldri sniði. Umsitingin hevur gjørt eitt yvirlit yvir tað innbúgv, sum er hóskandi til heimið.

Arbeitt verður í løtuni við at kanna, hvørjar ábøtur eru neyðugar, fyri at húsið skal lúka brunakrøv o.a. til eitt heim fyri eldri, og at søkja um stuðul frá Almanna- og heilsumálastýrinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til skipa heimið sum ein partur av Ellis- og umlættingarheiminum, sum sostatt verður uppnormerað við 8 búplássum og at søkja Almanna- og heilsumálaráðið um stuðul smbr. løgtingslóg um studningslán til ellis- og røktarheim.

Eisini verður mælt til at keypa innbúgv og at játta peningin av íløgunum á eldraøkinum. Kostnaður verður lagdur fram á fundinum.

**Sosiala nevndin 7. juli 2005:** Samtykt at taka undir við at heimið verður skipað sum ein partur av Ellis- og umlættingarheiminum.

Nevndin samtykti eisini, at heildarætlan verður gjørd fyri ognina.

**Ískoyti:**
J. P. Gregoriussen, arkitektur, sum upprunaliga teknaði húsini, er saman við umsitingini biðin um at gera eina heildarætlan fyri ognina.

Sambært tekningum, dagfestar 14. august 2005, ber til við smávegis broytingum at fáa pláss fyri 10 búfólkum. Tá er eisini niðasta hædd tikin við, har íbúð verður til eini hjún. Av tí at flestu búrúmini eru á ovastu hædd, verður mett neyðugt, at lyfta verður frá kjallaranum og upp á ovastu hædd.

Uttandura verður gjørd suðurvend terassa og gøta frá úthurð. Skipað verður fyri 4 p-plássum inni á grundøkinum. Starvsfólkini kunnu nýta parkeringsplássið við J. Nolsøesgøtu.

Samlaði kostnaðurin við 6,25% mvg. verður mettur til kr. 1.333.438. Innbúgv við meira verður mett til kr. 500.000,- . Samlaði kostnaðurin verður sostatt mettur til kr. 1.833.438,- og arbeiðstíðin til 5 mánaðir.

Umsókn um studningslán og játtan til rakstur varð 14. juli 2005 send almanna- og heilsumálaráðnum, sum við skrivi, dagfest 9. august 2005, hevur boðað frá, at parturin av umsóknini, sum snýr seg um rakstur frá 1. januar 2006, verður viðgjørdur saman við løgtingslógaruppskotinum fyri 2006.

Viðvíkjandi umsóknini um studningslán verður sagt, at landsstýrismaðurin hevur ætlanir um í heyst at leggja lógaruppskot fyri løgtingið um eina nýggja verklagslóg til fígging av íløgum til ellis- og røktarheim og sambýli, og at fyriliggjandi umsóknir um studningslán endaliga verða viðgjørdar, tá lógargrundalagið er broytt.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitiatión.

Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til heildarætlan, og at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión.

Av tí at tað í kostnaðarmetingini ikki er tikin hædd fyri møguligum óvæntaðum útreiðslum, verður mælt til at játta 2 mio. kr. til verkætlanina av íløgum á eldraøkinum.

**Sosiala nevndin 30. august 2005:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndin, til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum.

**Fíggjarnevndin 31. august 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 15. september 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari lisitatión. Lisitatión varð hildin 7. desember, og varð úrslitið:

| | | |
|---|---|---|
| Henning Hansen | kr. | 1.557.540,00 |
| Karstin Vang | - | 1.418.578,00 |
| D. Jacob Magnussen | - | 1.826.132,65 |
| Byggifelagið Articon | - | 1.730.538,00 |

Ráðgevin J. P. Gregoriussen, arkitektur, hevur kannað tilboðini og mælir til at taka av lægsta tilboðnum.

Samlaði byggikostnaðurin íroknað lyft, ráðgeving og partar av innbúgvi við 6,25% mvg. verður kr. 1.664.197,00. Eftir til innbúgv og útgerð eru sostatt kr. 335.803,00.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá ráðgevanum og taka av tilboðnum frá Karstini Vang.

**Sosiala nevnd 12. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum.

Vísandi til skriv frá Almanna- og heilsumála-ráðnum, dagfest 6. desember 2005, har boðað verður frá, at landsstýrið, grundað á politisku raðfestingina í síni viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2006, hevur tikið avgerð um ikki at raðfesta umsóknina viðvíkjandi uppnormering av búplássum á Tórs-havnar Ellis- og umlættingarheimið, samtykti nevndin at biðja um fund við avvarðandi landsstýrismann og formannin í løgtingsins fíggjarnevnd beinanvegin. Málið hevur skund.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006**: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd, treytað av, at almanna- heilsumálaráðið veitur stuðul til verkætlanina.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Nýtt:**
Almanna- og heilsumálaráðið hevur við skrivi dagfest 24. mai 2006 boðað frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at sýta umsóknini um studningslán til skipan av eldrasambýli í ognini oman Mattalág 5. Hinvegin mælir landsstýrismaðurin Tórshavnar kommunu til at taka upp samband við Heimarøktina, við tí endamáli at finna fram til á hvønn hátt ognin kann skipast sum bráfeingis umlættingarheim, ið verður umsitið av Heimarøktini.

Sum grundgeving verður í skrivinum nevnt, at til tess at tryggja, at húsini eru egnað til eldrabúpláss, hevur Almanna- og heilsumálaráðið havt umsóknina til ummælis hjá Heimarøktini. Víst verður til, at Heimarøktin í ummælisskrivinum ikki kann viðmæla, at húsini kunnu nýtast sum eldrabúpláss, eftir tær ætlaðu umbyggingarnar. Tó verður sagt, at hølini kundu verið egnað sum bráfeingis umlættingarheim til borgarar, sum annars megna at vera í egnum heimi við tænastu frá Heimarøktini. Løgtingslógin um studningslán heimilar tó ikki veiting av stuðli til skipan av umlættingarheimum.

Kommunan hevur fingið freist til 12. juni 2006 at gera viðmerkingar til avgerðina.

Vísandi til fyrisitingarlógina hevur umsitingin biðið Almanna- og heilsumálaráðið um innlit í ummælisskrivið hjá Heimarøktini.

Í ummælisskrivinum frá Heimarøktini verður als ikki nevnt, at húsini í Mattalág ikki kunnu nýtast til eldrasambýli, eftir tær ætlaðu umbyggingarnar. Í skrivinum verður sagt, at Heimarøktin hevur ta grundleggjandi fatan, at Sambýlir hoyra farnari tíð til. Sambýlir eru ikki tíðarhóskandi eind, hvørki sum partur av Heimarøktini ella sum sjálvstøðug skipan.
Løgtingið samtykti í desember 2005 lóg um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli, har tað í § 1 er ásett: *Studningslán úr landskassanum, sum er rentu og avdráttarfrítt, kann verða latið kommunum til keyp, nýbygging ella umbygging av*

*ognum, sum skulu nýtast til ellis- og røktarheim ella sambýli.*

Eisini samtykti løgtingið í desember 2005 við lóg at avhenda eldrasambýlið í Kollafirði til Tórshavnar kommunu.

At Heimarøktin hevur ta grundleggjandi fatan, at Sambýlir hoyra eini farnari tíð til, kann tí ikki av landsstýrismanninum brúkast sum grundgeving fyri ikki at játta studningslán til ognina oman Mattalág. Almanna- og heilsumálaráðið er tí biðið um at viðgera umsóknina av nýggjum.

**Sosiala nevnd 13. juni 2006:** Kunnað varð um málið.
**Nýtt:**
Í skrivi dagfest 9. mars 2007 hevur Almanna- og heilsumálaráðið boðað frá, at landsstýrismaðurin hevur gjørt av, at taka umsókn kommununar um studningslán til eldrasambýlið oman Mattalág upp til nýggja viðgerð. Í hesum sambandi hevur Almanna- og heilsumálaráðið heitt á Nærverkið um at koma við einum nýggjum ummæli.

Í sínum ummælisskrivi vísir Nærverkið á, at á loftshæddini meta tey tað ov lítið, bert at hava eittans w.c og mæla tí til, at tvey búrúm verða løgd saman til ætlaða hjúnarúmið, og at baðirúm við w.c. verður gjørt til hetta búrúmið. Nærverkið mælir tí til, at talan verður um fimm ístaðin fyri seks búrúm á loftshæddini. Eisini mælir Nærverkið til, at dururin við høvuðsinngongdina verður gjørdur eitt sindur størri, um hetta er gjørligt.

Við teimum broytingum, sum mælt verður til, metir Nærverkið annars, at ognin oman Mattalág er egnað til eitt eldrasambýlið til 9 búfólk.

Vísandi til ummælisskrivið frá Nærverkinum og tørvskanning Almanna- og heilsumálaráðsins annars, hevur landsstýrismaðurin gjørt av at veita Tórshavnar kommunu tilsøgn um studningslán til eldrasambýlið áljóðandi kr. 450.000,-, sum svarar til kr. 50.000,- pr. búfólk.

Tilsøgnin er treytað av, at
1 talan er um eina góðkenning í eitt avmarkað tíðarskeið
2 broytingarnar, sum Nærverkið hevur mælt til, verða gjørdar
3 verkætlanin er í tráð við kommunalu byggisamtyktina
4 í minsta lagi eitt umboð fyri Nærverkið verður tilnevnt í bygginevndina

Afturat tilsøgnini um studningslán er eisini ein tilsøgn um, at landið veitir fígging til rakstur av eldrasambýlinum eftir somu treytum, sum til onnur eldrasambýli. Kommununar partur verður rakstur av bygninginum og náttarvaktin.

Í sambandi við at talan er um eina góðkenning í eitt avmarkað tíðarskeið, hevur kommunan mælt til, at góðkenningin fyribils verður galdandi, til verkætlanin yviri við Strond er komin undir land. Um tað tá vísir seg, at tørvurin tá er nøktaður, eigur støða at verða tikin til, um ognin oman Mattalág til ta tíð møguliga kann verða brúkt til annað

endamál á eldraøkinum. Hesum hevur landsstýrismaðurin tikið undir við, og í skrivi dagfest 30. mai 2007 boðað frá, at góðkenningin fyribils er galdandi til verkætlanin yviri við Strond er liðug.

Ráðgevin J.P.Gregoriussen, arkitektur hevur í sambandi við kravdu broytingarnar gjørt nýggja kostnaðarmeting og dagføring av tilboðnum hjá Karstini Vang.

Samlaði kostnaðurin av umbyggingini við 6,25% mvg verður nú mettur til kr. 2.085.418,- Innbúgv og útgerð verður mett til kr. 500.000,- Við frádrátti av játtaða studningsláninum á kr. 450.000,- verður kommununar partur av útreiðslunum sostatt kr. 2.135.418,-.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við avgerðini hjá landsstýrismanninum, og at farið verður undir at umvæla ognina til endamálið. Eisini verður mælt til at taka av dagførda tilboðnum frá Karstini Vang, og at meirkostnaðurin við frádrátti av játtaða studningsláninum ella kr. 150.000,- verður játtaður av íløgum á eldraøkinum.

**Sosiala nevnd 5. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**105/07** **2007-1961**

**Nýggjur fólkaskúli á Hamrinum á Argjum**

Víst verður til mál, j. nr. 2003-2394. Byggiskrá og betran av hølisviðurskiftinum av Argja skúli.

**Á fundi 2. oktober 2006** á skrivstovuni hjá borgarstjóranum ynsktu Heðin Mortensen og Hildur Eyðunsdóttir, at býarskipanardeildin kannar, um møguleiki er at byggja ein skúla í tveimum sporum frá 1. til 9. flokk flokk við frítíðarskúla vestan fyri ítróttarøkið á Argjum ella uppi á Hamrinum.

Í brævi frá býarskipanardeildini dagfest 6. november 2006 er niðurstøðan:

**at** á Hamaranum er pláss bæði sunnanfyri og norðanfyri verandi stovn. Økið er ogn hjá Búnaðarstovuni og liggur í einum A3 øki.

**at** Økið vestan fyri Ítróttarøkið á Argjum er ogn hjá Búnaðarstovuni og liggur í 4. grundumráði. Tvs., at um hetta skal verða stovnsøkið, vil hetta krevja eina broyting av byggisamtyktini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla út frá teimum upplýsingum, sum nú eru í málinum, til at byggja ein skúla í tveimum sporum frá 1.-9. flokk við frítíðarskúla á Hamrinum á Argjum við barnagarðin.

Somuleiðis verður mælt til at byggiskráin verður endurskoðað.

**Mentamálanevndin 29. november 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 6. desember 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

Ein minniluti, Jan Christiansen, mælir eisini til at taka upp samráðingar um møguligt keyp av posthúsbygninginum.

**Býráðið 14. desember 2006:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

**Uppískoyti:**
Byggiskrá fyriliggur nú og mælir bygginevndin til at góðkenna byggiskránna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini.

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at góðkenna byggiskránna. Eisini samtykt at biðja umsitingina kanna møguleikarnar fyri lendi til komandi svimjihøll afturat skúlanum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna byggiskránna.

**Býráðið 21. juni 2007:** Einmælt samtykt.

**106/07** **<u>1999-0345</u>**

**Høllin á Hálsi**

Á fundi í býráðnum 23. september 2004 varð m.a. samtykt at gera eina byggitekniska meting av høllini.

Byggideildin hevur havt samstarv við BBP Arkitektar A/S um at útbyggja og umvæla høllina. Byggideildin hevur á fundi í býráðnum 30. mars 2006 kunnað um ætlaðu umbyggingina av Ítróttarhøllini á Hálsi.

Í uppskotinum er ein kostnaðarætlan og ein tíðarætlan.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at fara undir at gera hesa verkætlanina so skjótt sum til ber. Tað kann ikki metast ráðiligt at halda fram við at lappa uppá verandi høll. Ei heldur má tað metast ráðiligt at fara undir at umvæla høllina bert fyri at fáa hana í brúkiligan stand tó uttan at tillaga hana til øktan tørv og krøv til nýtslu.

Høllin á Hálsi hevur altíð staðið sum ímyndin av føroyskum innanduraítrótti, harumframt at vera stoltleikin fyri samkomu- og ítróttarvirksemi í Tórshavn. Hetta eigur Tórshavnar kommuna, sum landsins høvuðsstaður at leggja seg eftir at kunna siga um Høllina á Hálsi framyvir.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir mentamálanevndini til at taka undir við tilráðingini frá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Nevndin var á staðnum og var víst runt í høllini.

**Uppískoyti/tilmæli:**
Høllin, ið er yvirtikin av Tórshavnar kommunu fyrst í 2005, er niðurslitin, og tørvar átrokandi ábøtur. Fyri at fáa sum mest burtur úr eini so umfatandi umvæling, hava vit mett rættast eisini at hava við í hesum arbeiði eina dagføring av høllini, ið alt annað enn líkur krøvini, ið eru til eina tílíka høll í dag. Tí fyriliggur eitt skitsuuppskot, sum tekur støði í hesum. Atlit eru eisini tikin til, at hon framhaldandi, eftir at arbeiðið er gjørt, fer at verða “høllin” í Føroyum. Býararkitekturin hevur sagt um skitsuuppskotið, at hetta er eitt av teimum betru.

Í skitsuuppskotinum er samantvinna umbygging, uppíbygging og umvæling. Sambært kostnaðarmetingini hjá BBP-arkitektum kostar arbeiðið kr. 32.850.000 (danskir prísir, primo 2006)

Afturat hesum kemur projekterings- og ráðgevaraútreiðslur, kr. 3.942.000 (12% av 32 mill kr.).
Av tí at uppskotið ikki bert inniheldur viðlíkahald, men eisini uppíbygging v.m., halda vit tað er rætt eisini at býta samlaða metingina upp í tveir partar. Annar er

umvælingarparturin og hin er uppí- og umbyggingar parturin.

Út frá kostnaðarmetingini kemur fram, at kostnaðurin fyri alt arbeiðið er í " føroyskum kr" 37.777.500 mill. kr. Deila vit hetta upp í áður umtalaðu partar, fáa vit hesa uppdeiling:

| | | |
|---|---|---|
| Umvæling | kr. | 21.903.095 |
| Uppí- og umbygging | - | 15.874.405 |
| Samlað | kr. | 37.777.500 |

Í fjør játtaði býráðið 2,5 mill. kr. á konto 82 til Høllina á Hálsi at gera umvælingar fyri í 2006.

Býararkitekturin mælir til at tikið verður av øðrum av niðanfyri standandi tilmælum. Bæði ganga uppá at fáa sett projekteringsarbeiði í gongd nú.

Í tí fyrra tilmælinum verður mælt til, at arbeiðið verður gjørt út í eitt. Hetta hevur við sær, at eingin kann brúka høllina í byggitíðini, sum ætlandi verður liðug í september 2008.

Tað seinra mælir til, at arbeiðini verða gjørt í 4 byggistigum, soleiðis at yvir eitt rímiligt tíðarskeið stendur høllin liðug, sum skitsuuppskotið leggur upp til.

**1. tilmæli**

at projekteringin av skitsuuppskotinum verður gjørt av BBP-arkitektum, sum hava tillagað eina nýggja tíðarætlan. Teir kunnu byrja uppá projekteringina miðjan august í ár og hava hana lidna miðjan mai 2007. Arbeiðið kann byrja fyrst i juli 2007 og halda fram, til tað er liðugt, áðrenn hondbóltskappingin byrjar aftur í september 2008.

at játtanin til konto 82 verður hækkað við teim knapt 22 mill. kr., og tær írestandi knapt 16 mill. kr. sum íløga ella tiknar sum lán. Projekteringskostnaðurin verður goldin av teim 2,5 mill. kr., sum eru á konto 82, og tær írestandi 1,4 mill. kr. verða deildar soleiðis, at 1 mill. fer til konto 82 og 0,4 mill. kr. sum íløga ella lán. Sett upp í skema sær tað soleiðis út yvir 2 fíggjarár:

| | | |
|---|---|---|
| Hækka játtaninna til konto 82 | kr. | 21.903.095 |
| Partur av projekterings og ráðgeving | - | 1.000.000 |
| Samlað hækking til konto 82 | kr. | 22.903.095 |
| | | |
| Játtan til íløgu ella at upptaka lán | kr | 15.874.405 |
| Partur av projektering og ráðgeving | - | 442.000 |
| Samlað íløga ella lántøka | kr. | 16.316.405 |

Hækkan av játtan til konto 82 og játtan til íløgu ella lántøka verða gjørd yvir eitt tvey ára skeið, so hvørt sum tørvur er á peningi.

| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>21. juni 2007 | Blað nr.: 9024<br>Formansins merki: |
|---|---|

| | | |
|---|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2007 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. | 12.000.000 |
| Og íløga ella lántøka verða gjørd fyri fíggjarárið 2007 við | kr. | 8.000.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2008 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. | 11.000.000 |
| Og íløgan ella lántøka verður gjørd fyri fíggjarárið 2008 við | kr. | 9.000.000 |




Omanfyri sæst tíðaraksin fyri projektering og byggitíðina, um arbeiðið verður gjørt út í eitt.

**2. tillmæli**
Í øðrum lagið verður mælt til at projektið verður gjørt liðugt, soleiðis at partar av arbeiðnum kunnu longu byrja í 2007. Arbeiðið kann tá leggjast soleiðis tilrættis, at tað verður boðið út í størri og minni bitum alt eftir tí, sum er best byggitekniskt, og sum pengar verða settir av til.

<u>at</u> peningur verður settur av soleiðis, at projekteringin kann gerast liðug av BBP-arkitektum miðskeiðis í apríl 2007. Hetta fyri at umvælingararbeiðið kann gerast við støði í tí lidna projektinum, soleiðis at arbeiðið verður gjørt í størri og smærri bitum.

<u>at</u> peningur verður settur av til at gera 1. byggistig í fyrstu atløgu, sum umfatar rúmini á eystursíðuna fyrst. Hetta inniheldur at skifta takið, hækka gólvið á hædd við vallargólvið, umvæla og broyta skiftirúmini, wc rúmini og harvið eisini gera kloakkina á nýggjum og asfaltera gongubreytuna. Framsíðan skal gerast eftir tí nýggja uppskotinum, tvs. skifta klædningin út og skifta og broyta vindeyguni og úthurðarnar. Seta nýggja takrennu og rennustokk upp. Hesi arbeiði kunnu gerast við at hækka játtanina til konto 82 við 9 mill. kr. til fíggjarárið 2007.

Ein møgulig langtíðar ætlan kundi verið hendan.

**1. byggistig**

Umvæling og broyting av hølum, ið liggja úti við eystur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar. Takið skal eisini skiftast.

**2. byggistig**
Útbyggja endan norðureftir, við øllum.

**3. byggistig**
Útbyggja endan suður eftir við øllum.

**4. byggistig**
Taka niður áskoðarabeinkirnar og flyta vøllin inn í mittuna. Gera nýggj áskoðarapláss og umskapa rúmini, sum liggja út til vestur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar.

**Mentamálanevndin 13. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at 2,5 mió. kr., sum eru játtaðar til umvælingar av høllini 2006, verða nýttar til projektering av umvæling og umbygging, sambært uppskoti frá BBP Arkitektar A/S, februar 2006.

Eisini samtykt at viðgera málið aftur í mentamálanevndini eftir summarfrítíðina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini vóru á fundinum og greiddu frá.

Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

- Kommunan hevur arbeitt við einum projektið, ið fór at kosta 40 mill kr. umframt projekteringsútreiðslur.

Projekteringin er komin væl áleiðis og sambært sáttmála millum arkitektavirkið og Tórshavnar kommunu (TK) skal projektforslagið góðkennast av TK. Hetta liggur nú klárt til góðkenningar

Samlaði kostnaður fyri projektið er kr 47.680.000 við prístalsregulering og projektering.

Arbeiði gerast í 4 byggistigum.
1. byggistig: 1. februar 2008 – 31.oktober 2008
2. byggistig: 1. januar 2009 – 1. februar 2010
3. byggistig: 1. apríl – 27. august 2010

4. byggistig: 1. september – 30. juni 2011

Arbeiði verður fíggja av konto 90 soleiðis:

| | |
|---|---|
| Áður játtað, | 2.500.000 mill kr. |
| At játtað fyri 2007 | 6.000.000 mill kr |
| At játtað fyri 2008 | 6.415.000 mill kr |
| At játtað fyri 2009 | 14.326.680 mill kr |
| At játtað fyri 2010 | 12.829.240 mill kr |
| At játtað fyri 2011 | 5.599.080 mill kr |

Býararkitekturin mælir til at projektuppskotið, tíðarætlan og fíggingarháttur verða góðtikin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum. Somuleiðis verður mælt til at seta bygginevnd fyri verkætlanina, sambært ” Politisku/fyrisitingarligu mannagondir fyri verkætlanir”

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**107/07** **<u>2003-2242</u>**

**<u>Nýtt tyrvingarpláss</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Víst verður til mál 2003-0915 um tyrvingarplássið í Húsahaga. Tyrvingarplássið í Húsahaga verður fult um fá ár, og neyðugt er við drúgvum fyrireikingum, áðrenn annað øki kann takast í nýtslu sum tyrvingarpláss.

Umsitingin hevur í hesum sambandi, saman við ráðgevandi verkfrøðingunum sp/f Martin E. Leo, gjørt eina forkanning, ið er ætlað at vera grundarlag undir eini verkætlan

um nýtt tyrvingarpláss, j.nr. 200302242-3-SG.

Í forkanningini verða nevndir ymsir møguleikar fyri nýggjum tyrvingarplássi, t.d. grótbrotini á Glyvursnesi, í Hundsarabotni og á Sundi.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
Út frá kanningini verður mett, at skilabest er at arbeiða víðari við tveimum møguleikum, ávíkavist Glyvursnesi og Hundsarabotni. Eisini eigur at verða kannað um og í hvønn mun IRF er sinnað at samstarva við Tórshavnar kommunu um nýtt tyrvingarpláss.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at neyvari kanningar verða gjørdar av ávíkavist Glyvursnesi og Hundsarabotni sum tyrvingarpláss, herundir kostnaðarmetingar av neyðugum íløgum og rakstrarútreiðslum, at leggja fyri nevndina.

Tekniski stjórin mælir samstundis til at avsettar verða kr. 500.000,00 til projektering.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. desember 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum.

Eisini samtykt at umsitingin útgreinar tørvin á betri reinsiútbúnað enn tað, ið nú verður brúkt, og kostnaðin av hesum.

**Ískoyti:**
Ráðgevandi verkfrøðingafelagið sp/f Martin E. Leo hava saman við donsku ráðg. verkfr. fyritøkuni Rambøll A/S, gjørt nærri kanningar (Notat, dagfest 15. apríl 2004, j. nr. 200302242-8). Hesi pláss eru tikin við í kanningina:

1 Grótbrotið á Glyvursnesi
2 Grótbrotið í Hundsarabotni
3 Útbygging í Húsahaganum.

Í hesum sambandi er gjørda arbeiðið grundað á hesi viðurskifti:

4 Ávirkan á landslag og bústaðir.
5 Ávirkan á áir og firðir.
6 Nýtsla av økinum og náttúrutilfeingi.
7 Atkomuviðurskifti og flutningsfrástøða.

T.v.s. at tað í fyrsta umfari ikki beinleiðis verður tikin støða til plásstørv, rakstrarútreiðslur, funktión, reinsiatgerð, fyribils kostnaðarmeting v.m.. Tó bendir alt á sambært forkanningini, at viðv. plásstørvi, er Glyvursnes eisini best egnaða staðið.

Niðurstøðan í kanningini er, at eitt tyrvingarpláss, sum bæði tekniskt og umhvørvisliga verður mett at vera ein tíðarhóskandi loysn, við fyrimuni kann staðsetast í grótbrotinum á Glyvursnesi.

Vísandi til forkanning og kanningar, sum eru gjørdar á teimum nevndu støðunum saman við Rambøll A/S, mælir ráðgevandi verkfrøðingafelagið Sp/F Martin E. Leo til, at nýggja tyrvingarøkið verður í grótbrotinum á Glyvursnesi.

**Tilmæli:**
*Vísandi til umrøddu kanning og tilmæli frá ráðgevunum, mælir tekniski stjórin til, at grótbrotið á Glyvursnesi verður valt til nýtt tyrvingarpláss. Víðari verður mælt til at gera projektuppskot við tekniskari/búskaparligari greining av:*

8 Ruskmongdum/livitíð
9 Innrætting av økinum
10 Val av geologiskari verju
11 Uppsamling og reinsing av frárenning frá økinum
12 Gerð av kostnaðarmeting og tíðarætlan

*Eisini verður mælt til:*

at søkt verður um prinsipiella umhvørvisgóðkenning av økinum, tá ið neyðugt umsóknartilfar fyriliggur.
at kannað verður um friðingarmyndugleikarnir skulu geva loyvi sambært náttúrufriðingarlógini og um so er, at søkt verður um loyvi.
at heitt verður á fíggjarnevndina um at útvega lendi.
at heitt verður á byggi- og býarskipanarnevndina um at gera neyðugu broytingarnar í byggisamtyktini og at avseta økið til tyrvingarpláss.
at heitt verður á teknisku nevnd um at dagføra vegasambandi soleiðis, at tað verður hóskandi til regluliga tunga ferðslu.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. mai 2004:** Nevndin samtykti at umsitingin kannar møguleikan fyri at finna annað øki til tyrvingarpláss enn Glyvursnes.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við Ráðgevandi verkfrøðingafelagnum sp/f Martin E. Leo og Rambøll kanna aðrar møguleikar fyri tyrvingarplássi. Í hesum umfari eru hesi støð kannað:

13 Grótbrotið á Sundi.
14 Økið sunnan fyri Glyvursnes, í Glyvurshaganum.
15 Økið við gomlu sildaverkssmiðjuna, sunnan fyri Velbastað.
16 Grótbrotið á Glyvursnesi – enn einaferð.
17 Fossdalur norðan fyri Velbastað.

Niðurstøðan er, at av teimum higartil kannaðu økjunum er Grótbrotið á Glyvursnesi bæði umhvørvisliga, tekniskt og tá hugsað verður um nýtslutíðina best egnaða øki. Víst verður annars til niðurstøðuna og raðfestingina í hjálagda notati.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin heldur fast um tilmælið til seinasta fundin hin 19. mai 2004.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 23. juni 2004**: Ein meiriluti, Høgni Mikkelsen, Schumann Hjaltalin og Tórfinn Smith, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum.

Ein minniluti, Beate L. Samuelsen, tók ikki undir við tilmælinum.

Ein annar minniluti, Hildur Eyðunsdóttir, krevur málið fyri býráðið.

**Býráðið 2. september 2004:** Atkvøtt var um minnilutatilmælið frá Beate L. Samuelsen um at beina málið í heilsu- og umhvørvisnevndina sum var samtykt við 9-1 atkvøðum.

Fyri atkvøddu Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Schumann Hjaltalin, Høgni Mikkelsen, Jákup S. Joensen, Heðin Mortensen, Jan Christiansen, Elin Lindenskov og Hildur Eyðunsdóttir. Ímóti atkvøddi Leivur Hansen.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. september 2004:** Umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Ole Michaelsen frá Rambøll, ið er serkønur innan tyrvingarpláss, og sum saman við Sp/F Martin E. Leo hevur gjørt forkanningarnar í málinum, hevur framløgu um evnið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 3. februar 2005:** Kunnað var um málið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 14. september 2006:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina um at útvega ítøkiligari upplýsingar fyri útvegan og rakstur av tyrvingarplássi á Sundi samanborið við tyrvingarpláss á Glyvursnesi og at umsitingin kannar møguleika fyri íbinding í landsvegin á Sundi at leggja fyri nevndina á næstkomandi fundi.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva útvegað fleiri upplýsingar fyri útvegan og rakstur av tyrvingarplássi á Sundi samanborið við tyrvingarpláss á Glyvursnesi.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 7. desember 2006:** Ein minniluti, Beate L. Samuelsen og Marin Katrina Frýdal, mælir til at nýta økið á Sundi til tyrvingarpláss.

Ein annar minniluti, Jan Christiansen, mælir til at nýta økið á Glyvursnesi til tyrvingarpláss og vísir til tilmælið frá tekniska stjóranum til fundin í nevndini tann 19. mai 2004.

Ein triði minniluti, Katrin Dahl Jakobsen og Hildur Eyðunsdóttir, tekur støðu á býráðsfundi.

Ein samd nevnd mælir til at beina málið í byggi-og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. desember 2006:** Nevndin samtykti at kanna aðrar møguleikar fyri staðseting av tyrvingarplássi at leggja fyri nevndina á komandi fundi.

**Tekniska nevnd 13. desember 2006:** Málið tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sambært nevndarsamtykt frá 11. des. 2006 kannað aðrar møguleikar fyri staðseting av tyrvingarplássi. Notat fyriliggur í málinum, sum tekur útgangsstøði í nýggjum tyrvingarplássi á økinum við Lambafelli.

Býarverkfrøðingurin kemur at greiða frá uppskotinum og kemur við tilmæli til fundin.

**Tilmæli:**
*Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at Glyvursnes bæði fíggjarliga, umhvørvisliga og í mun til livitíð er skilabesta loysnin, og vísa tí til tilmælið til fundin 19. mai 2004, ið er soljóðandi:*

*Vísandi til umrøddu kanning og tilmæli frá ráðgevunum, mælir tekniski stjórin til, at grótbrotið á Glyvursnesi verður valt til nýtt tyrvingarpláss. Víðari verður mælt til at gera projektuppskot við tekniskari/búskaparligari greining av:*

18 Ruskmongdum/livitíð.
19 Innrætting av økinum.
20 Val av geologiskari verju.
21 Uppsamling og reinsing av frárenning frá økinum.
22 Gerð av kostnaðarmeting og tíðarætlan.

*Eisini verður mælt til:*

at søkt verður um prinsipiella umhvørvisgóðkenning av økinum, tá ið neyðugt umsóknartilfar fyriliggur.
at kannað verður um friðingarmyndugleikarnir skulu geva loyvi sambært náttúrufriðingarlógini og um so er, at søkt verður um loyvi.
at heitt verður á fíggjarnevndina um at útvega lendi.
at heitt verður á byggi- og býarskipanarnevndina um at gera neyðugu broytingarnar í byggisamtyktini og at avseta økið til tyrvingarpláss.
at heitt verður á teknisku nevnd um at dagføra vegasambandi soleiðis, at tað verður hóskandi til regluliga tunga ferðslu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 5. februar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjarti Mohr og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við tilmælinum og mæla í hesum viðfangi staðiliga til at skundað verður undir Glyvursvegin og brúnna úm Sandá.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við ætlanini, soleingi nýggj brúgv og

Glyvursvegurin ikki er gjørd.

**Tilmæli:**
*Vísandi til tilmælið og til samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini 5. februar 2007 mæla kommunustjórin, tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin til, at fíggjarnevndin:*

1 *ger avtalu við Búnaðarstovuna og festaran um útvegan ella leigu av lendinum*
2 *áleggur teknisku umsitingini at bjóða út prosjekteringsarbeiðið fyri sjálvt tyrvingarplássið millum føroyskar og útlendskar ráðgevarar at leggja fyri nevndina aftur*
3 *játtar pening til forprosjekt fyri tyrvingarplássið - fyribils mett til kr. 700.000 at fíggja av íløgum fyri 2007*
4 at heitt verður á fíggjarnevndina um at játtað pening til dagføring av vegasambandi, soleiðis at tað verður hóskandi til regluliga tunga ferðslu - fyribils mett til kr. 1.000.000, at fíggja av íløgum fyri 2007

**Fíggjarnevndin 16. februar 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Eisini samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 1.700.000 av íløgum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. februar 2007:** Kunnað varð um málið.

**Býráðið 22. februar 2007:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Bjarti Mohr, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Beate L. Samuelsen og Sjúrður Olsen.

**Tilmæli:**
Vísandi til at tað krevur ov nógva umsitingarliga orku at fyrireika útbjóðingartilfar til ráðgeva smb. punkt 2 í omanfyri standandi tilmæli, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til, at heitt verður á ráðgevandi fyritøkuna Rambøll um at gera byggiskrá og projekteringsarbeiðið fyri tyrvingarplássið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. juni 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum, og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Bjarti Mohr, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Beate L. Samuelsen og Sjúrður Olsen

**108/07** **2006-2731**

**Ferðslutrygdin við Hoyvíkar skúla**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Nevndarlimur hevur ynskt málið á skrá.
Umsitingin greiðir frá málinum.

**Tekniska nevnd 7. september 2006:** Nevndin samtykti, at umsitingin ger uppskot, sum tekur hædd fyri parkering og av- og ásetan við skúlan, at leggja fyri nevndina aftur skjótast gjørligt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur á fundi 12. september 2006 við umboð fyri Hoyvíkar Skúla greitt frá ymsum uppskotum til loysn á ferðslutrupulleikanum kring skúlan.

Uppskotið, sum partarnir eru samdir í at arbeiða víðari við at leggja fyri til endaliga politiska støðutakan, tekur støði í,

**at** verandi inn- og útkoyring eystan fyri frítíðarskúlan verður liðugtgjørt, tað vil siga, at talið av p-plássum verður óboytt,
**at** av- og ásetingarplássið norðan fyri frítíðarskúlan eisini verður gjørt liðugt við smærri broytingum, og
**at** skúlagarðurin verður asfalteraður, samstundis sum frárenningarskipanin verður afturgjørd.

Umframt hetta uppskotið, vóru partarnir eisini samdir um at arbeiða víðari við fyri-liggjandi uppskoti, sum tekniska nevndin á fundi í 8. desember 2005 samtykti við smærri broytingum.

Afturat hesum uppskotinum var eisini semja um at arbeiða víðari við uppskoti um p-plássið eystan fyri Hoyvíkshøllina.
**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játta kr. 100.000,00 av íløgum fyri vegir 2007 til

projektering v.m. at leggja fyri teknisku nevnd aftur til endaliga støðutakan.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 100.000 av íløgum 2006.

**Ískoyti:**
Umsitingin fer saman við umboðum frá Hoyvíkar Skúla at greiða frá arbeiðs-setninginum til ráðgeva. Tá ið projektið er klárt, verður tað framlagt fyri teknisku nevndini áðrenn farið verður undir møguliga útbjóðing.

**Tekniska nevnd 19. september 2006:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Leivur Hansen og Sjúrður Olsen, samtykti, at umsitingin letur gera 2 uppskot (uppskot 1 og 2, dagf. 13. sept. 2006) at leggja fyri nevndina aftur sum skjótast.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til at taka undir við uppskoti nr. 2 og at fara undir arbeiðið beinanvegin.

**Ískoyti:**
Í samráð við umboð frá Hoyvíkarskúla hevur umsitingin latið gera tvey uppskot til skipan av parkeringsøki og av- og áskipanarøki við Hoyvíkarskúla. Uppskot og kostnaðarmeting verður lagt fram á fundi í teknisku nevnd.

**Ferðslunevndin 5. desember 2006:** Nevndin tekur undir við báðum uppskotunum (j. nr. 2006-2731/5), men vísir á, at uppskot 1 hevur fleiri ferðslutekniskar fyrimunir í mun til uppskot 2. Víst verður til notat (j. nr. 2006-2731/7).

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Fyriliggjandi uppskot koma at kosta kommununi umleið 4,4 mió. kr., og er býtið soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1) | Umvæling av verandi skúlagarði | kr. | 765.650,00 |
| 2) | Umvæling av vegi og p-øki við skúla/frítíðarskúla | - | 628.645,00 |
| 3) | Parkeringspláss sunnan fyri høllina | - | 1.025.110,00 |
| 4) | Parkeringspláss eystan fyri og norðan fyri høllina | - | 1.204.150,00 |
| Samanlagt u/mvg | | kr. | 3.623.555,00 |
| Ókendar útr. ca. 10% | | - | 362.356,00 |
| Projekt og eftirlit 7% | | - | 253.649,00 |
| Bussskýli at flyta | | - | 150.000,00 |
| Samanlagt u/mvg | | kr. | 4.389.560,00 |

Sambært íløguætlan kommunurnar fyri 2007 og 2008 eru til verkætlanina settar 3 mió. í 2007 og 1 mió. í 2008. Tað vil siga, at tað koma at resta uml. 0,4 mió. í at fremja arbeiðið, og kann hetta gerast við at spara upp á asfalteringina í verandi skúlagarði.
Eftir sum eingin ítøkilig tíðarætlanin fyri arbeiðið fyriliggur er ilt at meta um nær farast kann undir arbeiðið, og hvussu langa tíð arbeiðið væntandi fer at taka. Best hevði verið

um arbeiðið kundi verið gjørt meðan summarferian er, men sambært íløgukarmunum ber ikki til at fara undir arbeiðið fyrr enn í seinni hálvu í 2007, tí um farið verður undir arbeiðið eftir summarferiuna í 2007 ella móti heysti, ber til at leggja arbeiðið soleiðis til rættis, at tað verður liðugt fyrst í 2008.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við niðurstøðuni hjá ferðslunevndini og at leggja málið fyri býráðið um fíggjarnevndina við umbøn um at fáa játtað 3 mió. kr. í 2007 og 1 mió. í 2008, áðrenn farið verður undir at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión.

**Tekniska nevnd 13. desember 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskoti nr. 2 við smávegis broytingum vísandi til, at skúlastjórin og starvsfólkið á skúlanum halda tað vera betri fyri ferðslutrygdina í økinum og at leggja málið fyri býráðið um fíggjarnevndina við umbøn um at fáa játtað 3 mió. kr. av íløgum í 2007 og 1 mió. í 2008, áðrenn farið verður undir at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 4.000.000,00 av íløgum 2007 og at fara undir arbeiðið beinanvegin.

**Býráðið 1. februar 2007:** Samtykt at taka undir við fíggjarnevndini við 12 atkvøðum fyri og 0 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Kári Árting, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

- Lisitatión var hildin 13. juni 2007 og inn komu 2 tilboð. Lægra tilboðið er frá P/F Articon álj. kr. 4.183.015 u/mvg. Samlaði kostnaðurin fyri arbeiðið, íroknað ókendar útr., flytan av busskýlum, projektering og eftirlit, verður uml. kr. 4.800.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við tilboðnum frá P/F Articon frá 13. juni 2007 og at heita á býráðið um fíggjarnevndina um at játta írestandi upphædd 0,8 mió. kr. av íløgum fyri vegir 2007, soleiðis at samlaða játtaða upphæddin er álj. 4,8 mió. kr.

**Tekniska nevnd 18. juni 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**109/07** **2007-0364**

**Uppskot til Reinsan av Hoydalsá 2. byggistig.**

**Lýsing av málinum-samandráttu**r:
Umsitingin hevur saman við sp/f Martin E. Leo gjørt uppskot til burturveiting av spillivatni stig 2, íð fevnir um økið vestan- og sunnan fyri Hoydalsá. Arbeiðið er uppsett at kunna verða gjørt í fleiri stigum. **A** sum er oman fyri Svartafoss,- **B** undir Svartafossi. - **C** niðan fyri Skraddaragøtu. - **D** - Norðari Ringvegur (øki við húsini hjá Hilmar Kass). Hesi stig kunnu roknast sum sjálvstøðugar eindir, so tað er ikki neyðugt at gera allar undir einum.
Ætlanin er at fara undir kloakkarbeiði B – undir Svartafossi í ár, hetta er mett at kosta kr. 2.500.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtað kr. 100.000,- til projektering at fíggja av íløgum fyri kloakkir í 2007, at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión, at leggja fyri nevndina aftur, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

Mælt verður harumframt til at flyta ætlaða íløgutørvin fyri kloakkarbeiði í 2007 og 2008 soleiðis at:

1. Mál nr. 2007-0787 Reinskan av Vestaru Vág, stig 3: Pumpubrunnur Bøgøta-Vágsbotnur – mett til uml. 2,5 mió. kr.- verður flutt frá 2007 til 2008.
2. Mál nr. 2007-0364 Kloakk við Hoydalsá, Stig 2, - eisini mett til uml. 2,5 mió. kr. - verður framflutt frá 2008 til 2007.

**Tekniska nevnd 8. mars 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum og mælir býráðnum um fíggjarnevndina til at játta kr. 100.000,- til projektering av íløgum til kloakkir fyri 2007.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. mars 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Lisitatión var hildin 12. juni 2007 og inn kom 1 tilboð. Hetta tilboðið var frá Maskingrevstur v/Frank Hellisdal, álj. kr. 2.001.330,- og sum var lægri enn kostnaðarmetingin.

Samlaði kostnaðurin fyri arbeiðið, íroknað ókendar útr., projektering og eftirlit, verður uml. kr. 2.572.900,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við tilboðnum frá Frank Hellisdal frá 12. juni 2007 og at heita á býráðið um fíggjarnevndina um at játta írestandi upphædd 72.900,- kr. av íløgum fyri kloakkir 2007, soleiðis at samlaða játtaða upphæddin er álj. 2.572.900,-.

**Tekniska nevnd 18. juni 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**110/07** **<u>2007-0292</u>**

**<u>Uppskot til kloakk frá íbúðunum hjá Sp/f Valbjørn Dalsgarð á Argjum.</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Nú Valbjørn Dalsgarð, byggimeistari er farin undir at byggja 277 íbúðareindir á Hamrinum á Argjum, verður neyðugt at leggja eina nýggja høvðuskloakk til hetta øki. Ætlanin er at leggja hesa undir Hamrinum, út um bygdina og oman á sjógv.

Kloakkskipanin á Argjum er vánalig, so tað er ikki ráðiligt at veita meira í hesa, samstundis sum krav er um at allar veitingar skulu út í opnan sjógv.

Talan er um at byggja ein skúla heiman fyri barnagarðin á Hamrinum, og skuldi tá verið møguleiki at nýtt somu kloakk.

Biðið verður um at ráðgevi ger uppskot klárt til útbjóðingar, og at játtað verður kr. 155.000,00 til projekteringsútreiðslur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtað kr. 155.000.00 til projektering at fíggja av íløgum fyri kloakkir í 2007, at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión, at leggja fyri nevndina aftur, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.
**Tekniska nevnd 8. mars 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. mars 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Projekteringin er framd av PB-Consult Sp/f, og er uppskot við tíðar- og kostnaðarmeting gjørd yvir arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður við uppskotinum, og at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión.

**Tekniska nevnd 7. juni 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og tekniska stjóranum at taka undir við framlagda uppskotinum tekning nr. V(50) 001 frá PB Consult, dagf. 06.06.07.

Nevndin mælir eisini til, at gøta verður gjørd oman á kloakkleiðingini og at málið um gøtuna verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina og at gøtan eisini er við í útbjóðingini sum serskildur postur.

**Nýtt:**
Í sambandi við at farið verður undir arbeiðið at leggja høvuðskloakk frá útstykkingini undir Kongavarða, skal støða takast til hvussu frárenningin til høvuðskloakkina skal gerast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin koma við tilmæli til fundin

**Tekniska nevnd 18. juni 2007:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2007:** Tikið av skrá.

**Býráðið 21. juni 2007:** Tikið av skrá.

**111/07** **<u>2007-1903</u>**

**<u>Ferðsluviðurskifti við Sigmundargøtu.</u>**

**Lýsing av málinum-samandráttu**r:
Í sambandi við at Landsverk hava gjørt ábøtur á matr. 943, Tórshavn, Sigmundargøtu 5, og skorið flest øll trø niður í gamla Landslæknabygninginum, skal støða takast til um kommunan skal nýta høvi til at breiðka Sigmundargøtu. Garðurin skal takast niður, og gongubreyt gerast á einari síðu. Hetta viðførir, at komið verður einar 2,5 m inn í garðin.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 150.000 at gera skitsuuppskot og at farið verður undir samráðingar við eigararnar av lendinum.

**Tekniska nevnd 18. juni 2007:** Nevndin samtykti at venda aftur til spurningin um ferðsluviðurskiftir í Sigmundargøtu í sambandi við viðgerðina av málinum um heildarætlan fyri Skálatrøð.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2007:** Tikið av skrá.

**Býráðið 21. juni 2007:** Tikið av skrá.

**112/07** **2006-1204**

**Serstøk byggisamtykt fyri Stjórutjørn**

**Lýsing av málinum**:
Í sambandi við verkætlanina fyri Stórtjørn, er gjørt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið.

Við heimild í 4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður ásett:

Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfestu fylgjuskjølum og er partur av matr. nr. 139a, 135ed, 135a og 1 æf, Hoyvík, (skal møguliga broytast í sambandi við matrikulering) og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ognum.

Endamálið við serstøku byggisamtyktini er at skipa bústaðar-, vinnu-, stovnsbygging og bygging til frítíðar og ítróttarendamál.

Størsti partur av økinum, sum serstaka byggisamtyktin umfatar, har bústaðar-, vinnu-, stovnsbygging verður skipað, liggur í A3 øki í 3. grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, ið er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virki, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt, ið samsvarar við umhvørvisflokking í Tórshavnar kommunu.

Restin av økinum, sum serstaka byggisamtyktin umfatar, har bygging til mentanar-, frítíðar- og ítráttarendamál verður skipað, liggur í liggur í D2 øki í 3. grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, ið verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman

við ítróttinum.

Samlaða økið sum serstaka byggisamtyktin fyri Stórutjørn umfatar verður sundurbýtt í 7 eindir.

Eindin I, Vinnuøki
Eindin skal nýtast til miðstaðaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki ið hava samband við hetta.

Eindin II, Vinnuøki
Eindin skal nýtast til miðstaðaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki ið hava samband við hetta.

Eindin III, Bústaðarbygging
Eindirnar skulu nýtast til bústaðarbygging og bygd mugu einans verða raðhús, íbúðarbygningar ella teimum líkir bústaðir

Eindin IV, Bústaðarbygging
Eindirnar skulu nýtast til bústaðarbygging og bygd mugu einans verða íbúðarbygningar ella teimum líkir bústaðir

Eindin V, Bústaðarbygging
Eindirnar skulu nýtast til bústaðarbygging og bygd mugu einans verða íbúðarbygningar ella teimum líkir bústaðir

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Stórutjørn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2007:**
Ein meiriluti: Elin Lindenskov, Leivur Hansen, Bjarti Mohr og Sjúrður Olsen samtyktu at taka undir við tilmælinum, við hesum broytingum í uppskotinum til serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn dagfest 20. juni 2007:

At fyri § 7, stk. 4, verður punkt e) strikað og orðingin í punkt d) verður: Á vegastrekkinum h-f kann nýtslan í veghædd verða til handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið náttúrliga hoyra bústaðarøkinum til, og sum fylgja umhvørvisflokkum 1 ella 2 sambært góðkendari umhvørvisflokking fyri vinnuvirkir í Tórshavnar kommunu. (Fylgiskjal 1).

At fyri § 7, stk. 1, litra b) hædd á 40 m verður broytt til 49 m.

Ein minniluti: Hildur Eyðunsdóttir tekur støðu í býráðnum.

**Býráðið 21. juni 2007:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddi: Beate L. Samuelsen,

- Nú fór Høgni Mikkelsen

**113/07** **2007-1911**

**Skriv frá Anniku Olsen, býráðslimi, dagfest 12. juni 2007, viðv. umbygging/umvæling av gamla realskúlanum.**

Undirritaða ynskir at fáa málið um umbygging/umvæling av gamla realskúla fyri til viðgerðar á býráðsfundi tann 21. juni.

Undirritaða hevur biðið um at fáa málið um umbygging/umvæling av gamla realskúlanum fyri á mentanarnevndarfundi, men hendan umbønin er ikki gingin á møti.

Sum býráðslimur má eg harliga átala mannagongdina í hesum málið, tí tá ið tað snýr seg um eina so stóra bygnaðarbroyting og innrás í virksemi skúlans eigur hetta at viðgerðast fyrst og fremst í mentanarnevndini og í tøttum samstarvi við lærarar, leiðslu skúlans og skúlastýrið fyri kommunuskúlan. Harumframt er hetta kostnaðarmikla arbeiðið ikki játtað av fíggjarnevndini og av býráðnum.

Vónandi verður hendan umbøn gingin á møti.

**Býráðið 21. juni 2007:** Atkvøtt varð um tilmælið frá Hildur Eyðunsdóttir, um at beina málið í mentamálanevndina, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

- Nú kom Høgni Mikkelsen

**114/07** **2006-1573**

**Umvæling av Degns hús og uttanum øki matr. nr. 425, Tórshavn**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Degn´s hús eru fríðkaðið uttan í ávísan mun í 2006. Húsini eru málaðið, nýtt flag er lagt á tekjuna, hellan er reinsað omanfyri húsini, og yvirflatuvatn er beint burtur frá húsinum o.s.fr.

Umsitingin hevur nú útvegað tilboð upp á arbeiðið at fríðka og gera liðugt økið uttanum húsini. Tilboðið fevnir um rudding, gerð av gøtum, laging og umvæling av garði, timburterassu móti Tinghúsvegnum, grasvøllin og legging av skervi kring húsini. Tilboðið er áljóðandi kr. 213.809 u. mvg.

Tað sum írestar til liðugtgerð av uttanduraøkinum er drening og liðugtgerð av kloakkleiðingum v.m.

Umsitingin hevur eisini gjørt eina leysliga meting av hvat eigur at gerast inni í húsinum á miðhæddini og loftshæddini, soleiðis at húsini kunnu nýtast til virksemi av slíkum slag sum hevur við tænastuveitingar o.l. at gera. Nakrir veggir eiga at takast niður, gamalt tapet o.l. takast av, gólvbelegningur takast av, el-leiðingar skiftast út o.s.fr. Loftshæddin eigur stórt sæð at ruddast fyri veggir, gólvið umvælast og hølvast, og loftsklæðing eigur at setast upp, eins og loftshæddin eigur at verða bjálvað.

Tíðarætlan:
Umsitingin mælir til, at uttandura arbeiðið verður sett í gongd beinanvegin, við tí fyri

eyga at hava tann partin sum er út móti Tinghúsvegnum lidnan til Ólavssøku. Viðv. innandura arbeiðinum verður mælt til at tilboð verða innheintaðið, og at arbeiðið kann verða liðugt til jólar 2007.

| | | |
|---|---|---|
| Kostnaðarmeting: | | |
| Ábøtur v.m. á húsini útv. (2006) | kr. | 212.000,- |
| Liðugtgerð av lendinum uttan | kr. | 213.809,- |
| Kloakkering v.m.(2007) | kr. | 100.000,- |
| Ábøtur og liðugtgerð innan | kr. | 400.000,- |
| | kr. | 925.809,- |
| Prosjekt og eftirlit 10% | kr. | 71.000,- |
| Ókent 12% | kr. | 86.000,- |
| Mvg 6,25% | kr. | 67.676,- |
| **Tilsamans** | **kr.** | **1.150.485,-** |

| | | |
|---|---|---|
| Fígging: | | |
| Er fíggjað av rakstri 2006 | kr. | 225.000,- |
| At játta til lendisarbeiðið í 2007 sum eykajáttan | kr. | 400.000,- |
| Fyribils fíggjarkarmur at játtað til liðugtgerð innan | kr. | _525.485_ |
| **Tilsamans** | **kr.** | **1.150.485,-** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta Húsaumsitingini kr. 400.000 til liðugtgerð av uttanumøkinum við Degn´s hús, og at beina málið í figgjarnevndina til góðkenningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juni. 2007:** Ein meiriluti: Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir og Leivur Hansen, mæltu til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jan Christiansen og Sjúrður Olsen mæltu til at ognin verður seld til hægstbjóðandi.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Leivur Hansen og Hildur Eyðunsdóttir, mælir býráðnum til at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini.

Jan Christiansen mælir býráðnum til at selja ognina fyri hægst bjóðandi.

**Býráðið 21. juni 2007:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Jan Christiansen, um at taka upp samráðingar við Løgtingið um Degns Hús, so Løgtingið kann byggja ein fyrisitngarbygning til teirra virksemi, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov og Annika Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Bjarti Mohr

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Beatel L. Samuelsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**115/07** **2001-0407**

**Landsvegaføring frá Hjalla til Krákugjógv**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ivi hevur tikið seg upp, um tað er rætt at fremja tað ætlaða 1. byggistigið av atkomvegnum til Havnar (Ytra ringvegi), úr Krákugjógv undir Húsareyni norður í Sundsvegin, í tí líki, ætlanin fyriliggur.

Fleiri orsøkir eru til ivan. Nógv er broytt á samferðsluøkinum, síðani hesin vegur var stungin út fyri 20 árum síðani. Fast samband er fingið í lag í Vágar, fyrsta dagin verður koyrandi undir Leirvíksfjørð, og um fá ár verður tunnil millum Skálafjørðin og Suðurstreym ætlandi veruleiki. Aftrat hesum eiga vit at rokna við føstum sambandi í Sandoynna.

Sostatt er í dag talan um ógvuliga nógv broyttar fortreytir í mun til støðuna fyri 20 árum síðani, og við framtíðini í huga má hædd takast fyri hesum.

Stórir vansar eru við ætlaða vegateininum, sum fer at elva til langar bíðirøðir út í frammanundan nógv trafikerað øki.

Vegurin fer gjøgnum bygt øki, sum vit í dag ikki eiga at góðtaka eins væl og fyri 20 árum síðani.

Nógv ognartøka skal til eftir øllum teininum. Vegurin liggur í einum skráa við vanda fyri grót- og áarlopi. Nógvur kavi legst á teininum og krevur nógva rudding.

Fyri umhvørvið sum heild fer hetta inntriv at hava ógvuslig árin.

Tí eigur 1. byggistig av atkomuvegnum til Havnar (Ytri ringvegur) at verða lagt øðrvísi. Besta loysn er at leggja vegin í tunnil. Hendan loysnin leggur so at siga einki øki undir seg og fer at lætta um á kommunala veganetinum.

**Býráðið 15. desember 2005:** Uppskot frá býráðsmeirilutanum: Til tess at gera greitt, hvat Tórshavnar býráð heldur um vegaføringina í 1. byggistigi av atkomuvegnum til Havnar (Ytra Ringveg) samtykkir býráðið at siga frá, at hon eigur ikki at vera, sum hon er stungin út, men framd við tunli ella vegaføring upp um Húsareyn.

Samtyktin verður beind í teknisku nevnd til viðgerðar at leggja aftur fyri býráðið.

Atkvøtt varð um uppskotið, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

**Fyri atkvøddu:** Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

**Ímóti atkvøddu**: Inga Dahl, Bjarti Mohr og Beate L. Samuelsen.

**Ískoyti:**
Farið verður á ástaðarfund undir Krákugjógv.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006:** Eftir at hava verið á staðnum samtykti nevndin at mæla býráðnum til at halda fast við, at vegaføringin í 1. byggistigi av atkomuvegnum til Havnar (Ytra Ringvegi) verður framd við tunnli úr Krákugjógv undir Húsareyni norður í nýggja atkomuvegin við Sundsvegin.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at leggja atkomuveg til Havnar, er Landsverk sum kunnugt farin undir fyrra part av anleggsarbeiðinum, sum er strekkið frá økinum norðan fyri útstykkingina millum Gilja og suður í móti økinum við Oyggjarvegin - undir Krákugjógv.

Sambært Landsverki er ætlanin, at hetta strekkið skal verða liðugt í 2008, og at strekkið frá Skarðshjalla og suður ímóti verandi atkomuvegi skal vera liðugt í 2012.

Landsverk ætlar nú at fara undir vegarbeiðið á strekkinum frá brúnni um Hoydalsá og suður í móti økinum undir Krákugjógv.

Í sambandi við viðgerðina av øllum projektinum um atkomuvegin hjá landsverki, eru ítøkilig viðurskifti, sum kommunan eigur at taka støðu til. Hesi viðurskifti eru:

1. Íbinding við Eysturoyartunnilin
2. Planskyld íbinding við ídnaðarøki og Stórutjørn
3. Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn
4. Liðugtgerð av planskyldari íbinding norðan fyri útstykkingina Millum Gilja so at atkomuligt er til Flatarvegin
5. Brúgvaskap á vegamótinum millum landsvegin og Flatarvegin. Skal avtala fáast í lag við Landsverk um fyribils at binda í atkomuveg – ella skal farast undir at gera brúgv, áðrenn ferðsla verður á strekkinum.
6. Umlegging av Sundsvegnum
7. Støðutakan til tunnilsloysn við Villingardalsvegin
8. Støðutakan til íbindingina undir Krákugjógv
9. Støðutakan til íbinding við Hotel Føroyar
10. Støðutakan til atkomuveg til Velbastaðvegin
11. Støðutakan til verandi íbinding við Oyggjarvegin
12. Veitingar á landsvegi
13. Frástøða - byggilinja

Víst verður til fund, j.nr. 2003-1884/12, millum umboð fyri Tórshavnar kommunu og Sp/f HMP-Consult, sum er ráðgevi hjá Landsverki í hesum máli.

Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. november 2006:** Kunnað var um málið.

**Tekniska nevnd 30. november 2006:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Vinnumálaráðið sigur í skrivi, dagfest 5. september 2006, at hóast tað framvegis er metingin, at verandi vegaætlan við Villingardalsveg er ein fullgóð loysn, er ráðið sinnað at ganga ynskinum hjá býráðnum um tunnil á møti, um býráðið góðtekur at gjalda kostnaðarmunin millum ætlaðu vegaloysnina og tunnilsloysnina, sum er í uppskoti, og hartil meirkostnaðin av rakstrinum í eitt áramál.

Sambært einari leysliga meting er kostnaðarmunurin millum ætlaðu vegaloysnina og tunnilsloysnina einar 30 mió. kr. umframt meirkostnað í rakstri.

Treytirnar fyri einari slíkari avtalu eru, at umrøddi teinur verður landsvegur, at kommunan tekur meirkostnaðin fyri tunnilsloysnina uppá seg, og at Landsverk kann góðtaka loysnina vegatekniskt.

Býráðið eigur eisini at hava í huga, at ferðslan eftir hesum vegastrekki sambært framrokningum fer at økjast tey næstu 15-20 árini í so stóran mun, at tað helst verður neyðugt at gera eitt tunnilsrør afturat og kannast má tí, um tað av teknisku ávum er neyðugt at spreingja tunnil nr. 2 samstundis sum tunnil nr. 1, og um so er, má kommunan eisini gjalda meirkostnaðin av hesum.

Tekniska umsitingin vísir á, at við tí vegalinju, sum nú er kend, eru tað ikki ferðslutekniskar orsøkir til at gera tunnilin undir Krákugjógv.

Tekniska umsitingin staðfestir eisini, at tað eru ikki annarleiðis umhvørivslig atlit at taka á økinum við Krákugjógv enn aðrastaðni fram við ytra ringvegnum, tá talan er um frástøða frá bygdum øki, náttúruviðurskifti o.l.

Tekniska umsitingin metir tí, at nyttuvirknaðurin av einum tunnli undir Krákugjógv ikki svarar til ein meirkostnað á kr. 20-30 mió. í kommununnar part, samsvarandi skrivi frá Føroya landsstýri og eini leysligari kostnaðarmeting.

Í sambandi við fíggjarliga partin skal eisini vísast á, at ein tunnil vil gerast dýrari í rakstri enn við at hava ein vanligan veg út frá teimum fortreytum, sum landsvegamyndugleikin rekur landsveganetið uppá.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi mæla kommunustjórin og tekniski stjórin frá at gera tunnil undir Krákugjógv.

**Fíggjarnevndin 6. desember 2006:** Ein meiriluti, Jan Christiansen, Høgni Mikkelsen og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum og tekniska stjóranum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Hildur Eyðunsdóttir, taka støðu á býráðsfundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 11. desember 2006:** Málið tikið av skrá.

- Ráðgevandi fyritøkan P/F HMP Consult hevur fyri Landsverk gjørt nýtt uppskot til nýggja landsvegaføring til og uttan um Tórshavn. Onnur uppskot hava verið gjørd áður. Í løtuni eru 3 landsvegainnføringar til Tórshavn. Hesar eru eftir Kaldbaksvegnum, eftir gamla Oyggjarvegnum og eftir vegnum í Havnardali frá Gomlurætt. Nýggi landsvegurin norðan fyri høvuðsstaðin kemur at binda saman allar hesar 3 landsvegainnføringarnar til Tórshavn. Nýggi landsvegurin byrjar úr verandi Kaldbaksvegnum beint eystan fyri Skarðshjalla, og fer so gjøgnum Hoyvíkshagan yvir til Villingadal og fram við Húsareyni, har hann verður bundin í verandi Oyggjarvegin. Haðani er vegurin ætlaður at fara gjøgnum Flatnahagan út í Havnardal, har hann verður bundin í verandi landsvegin til Gomlurætt.

Um tunnil millum Skálafjørðin og Havnina gerst veruleiki, kemur hesin at blíva íbundin Kaldbaksvegin ella omanfyri nevnda nýggja landsvegastrekkið.

Landsveganetið í Føroyum bindir saman bygdir og býir, uttan mun til støðd. Í Tórshavn eru fleiri einstakir býlingar, sum einsamallir eru nógv størri enn fleiri bygdir. Framskrivingar av býarmenningini vísa m.a., at serliga uppi í Hoyvíkshaganum, í Vesturbýnum og á Argjum fer munandi vøkstur at verða í bæði fólkatali og tali av bústaðareindum.

Tekniska umsitingin metir tað vera sera umráðandi, at av- og ákoyringar til nýggja landsvegin verða skipaðar í tøttum samstarvi við Tórshavnar kommunu. Tryggjast má ein góð fordeiling av ferðsluni, og at bæði verandi og komandi kommunala veganetið er ført fyri at lofta ferðsluni og fordeila ferðsluna á rættan hátt, fyri ikki at fáa ferðsluruðuleika inni í býnum. Tí er eisini umráðandi at tal, støðd og staðseting av íbindingum í landsvegin taka støði í støðd av býlingunum (fólkatal og bústaðareindir), tí sum longu nevnt eru fleiri býlingar sum eru nógv størri enn heilar bygdir.

Í sambandi við viðgerðina av øllum prosjektinum um atkomuveg hjá Landsverk, hevur umsitingin á eini verkstovu 5. desember 2006 viðgjørt niðanfyri standandi viðurskifti.

1. Vegakategori og framtíðar tillagingar av vegastrekkinum
2. Íbinding við Eysturoyartunnilin
3. Íbinding við vinnuøkini Sandvíkarhjalli, Skarðshjalli og Ovari Hjalli
4. Planskyld íbinding við Stórutjørn
5. Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn
6. Íbinding við Flatarvegin
7. Umlegging av Sundsvegnum
8. Íbinding við Villingadalsvegin
9. Støðutakan til tunnilsloysn við Villingadalsvegin
10. Íbinding í verandi veganet undir Krákugjógv
11. Oyggjarvegurin frá Hotel Føroyar til Norðara ringvegin
12. Íbindingar á økinum við Hotel Føroyar
13. Vegaføring og íbinding í Velbastaðvegin
14. Støðutakan til verandi íbindingar við Oyggjarvegin
15. Støðutakan til veitingar til el, vatn, kloakk, fjarhita og reinskan av vegvatni.
16. Støðutakan til gonguteigar og súkklubreytir.
17. Støðutakan til byggilinju (frástøðu) frá landsvegnum

**Tilmæli:**
Við støði í viðgerðini á verkstovuni mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin til:

**1. Vegakategori og framtíðar tillagingar av vegastrekkinum**

Grundað á ferðsluframskrivingar verður mælt til at taka undir við, at vegurin verður fyrireikaður til ein 4-sporaðan veg til ferðslu við 80 km/t, og at vegurin horisontalt- og vertikalt verður tilevnaður hesum fyritreytum.
Mælt verður tó samstundis til, at á vegastekkinum frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar, verður ferðin avmarkað til 50 km/t, og at íbindingarnar millum kommunala veganetið og landsvegin verða gjørdar sum stórar rundkoyringar. Hetta er ikki minst neyðugt fyri at fleiri stórir komandi býlingar, sum koma at liggja uttan fyri landsvegin, fáa samband við hendan. Tá ársmiðalferðslan í framtíðini fer upp um 20.000 bilar um samdøgri, kann ferðin hækkast til 80 km/t, samstundis sum íbindingarnar kunnu endurskoðast, og støða takast til um vegurin skal gerast 4-sporaður.

2. **Íbinding við Eysturoyartunnilin**
   Onki ítøkiligt fyriliggur enn uppá hvar linjuføringin fyri ætlaða tunnilin millum Skálafjørðin og Havnina verður, og tískil heldur ikki uppá hvar tunnilin eftir ætlan kemur upp og hvar íbinding verður í landsvegin. Mælt verður til, at Tórshavnar kommuna, sum planleggingarmyndugleiki í kommununi, setir fram krav um at verða við til at taka avgerð um, hvar og hvussu tunnilin kemur upp.

3. **Íbinding við vinnuøkini Sandvíkarhjalli, Skarðshjalli og Ovari Hjalli**
   Í løtuni fyriliggur ikki eitt nóg neyvt grundarlag at taka støðu til, bæði um, hvar ella hvussu kommunala veganetið við verandi vinnuøkir á Sandvíkarhjalla og Skarðshjalla, og eitt komandi vinnuøki á Ovara Hjalla, skulu bindast í landsveganetið. Mælt verður tí til, at hetta verður kannað nærri í sambandi við útstykkingar- og byggiætlaninar í økjunum, og at lendi til eina møguliga íbinding við rundkoyring við Ovara Hjalla verður hildi tøkt, til greiða er fingin á hesum. Tí verður mælt til, at vegasamband til Ovara Hjalla verður gjørt við eini rundkoyring frá Hvítanesvegnum.

4. **Planskyld íbinding við Stórutjørn**
   Mælt verður til, at gjørd verður planskyld íbinding við Stórutjørn. Hetta verður fyrsta stóra íbindingin millum kommunala- og landsveganetið á strekkinum, og eigur henda íbinding tí at rindast av Landsverk.
   Mælt verður til, at vegastrekkið frá íbindingini í Kaldbaksvegin til planskyldu íbindingina við Stórutjørn, beinanvegin verður gjørt sum 4-sporaður vegur við mest loyvdu ferð á 80 km/t. Vísandi til omanfyri standandi pkt. 1 verður eisini mælt til, at á vegastrekkinum frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar, verður mest loyvda ferðin sett til 50 km/t.
5. **Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn**
   Ynski er sett fram um at fáa landsvegalinjuna flutta 50 m longur norður – tvs. burtur frá Stórutjørn. P/F HMP Consult hevur kannað møguleikan fyri hesum, og onki er til hindurs fyri tí. Men ein slík flyting av vegalinjuni vil viðføra, at ein partur av vegastrekkinum, sum longu er gjørt, má umleggjast. Kostnaðurin fyri hetta arbeiði er av Landsverk mettur til kr. 2,0 mió. Mett verður, at Landsverk undir øllum umstøðum eigur at flyta vegin uml. 25 m longur norður júst við Stórutjørn, fyri at

tilpassa vegin betur til lendisviðurskiftini á staðnum – tvs. av umhvørvisávum. Við verandi linjuføring kemur vegurin nærum í sjálva tjørnina, og kemur harumframt beint inn í ein høgan kneysa í lendinum. Mælt verður tí til, at Landsverk skal flyta vegaføringina minst 25 m longur burtur frá Stórutjørn, fyri at fáa vegin at fella betur í lendi og fyri ikki at koma so nær tjørnini.

6. **Íbinding við Flatarvegin**
   Tað verður mett serstakliga umráðandi, at tað á vegastrekkinum frá Stórutjørn til Oyggjavegin verða tikin atlit til verandi kommunala veganet, og hvussu ferðslan av landsvegnum verður fordeild eftir verandi vegum inn til Vegin Langa og haðani víðari til Norðara ringvegin. Flatarvegurin er ein av hesum vegum.
   Fram til 2012, tá hesin parturin av landsvegnum eftir ætlan verður liðugur, verður mælt til at Flatarvegur, Sundsvegur og Villingadalsvegur verða bundnir í landsvegin, og at teir partar av vegnum, sum eru lidnir, sostatt verða nýttir beinanvegin.
   Fyri tíðarskeiðið aftan á 2012 verður mælt til, at minst 2 av teimum 3 verandi vegunum á staðnum – t.e. Flatarvegurin, Sundsvegurin og Villingadalsvegurin, verða íbundnir landsvegin við rundkoyring, sum er minst 32 m í diametur. Nóg stórt økið skal tó leggjast av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera planskylda íbinding har um leiðir, um ársmiðalferðslan fer upp um 20.000 og avgjørt verður at hækka mest loyvdu ferðina á strekkinum til 80 km/t (sí pkt. 1.)

7. **Umlegging av Sundsvegnum**
   Brúgv er gjørd tvørtur um Hoydalsá. Her er sostatt eisini møguligt at føra Sundsvegin undir landsvegin. Við at binda Sundsvegin í landsvegin, fæst beinleiðis vegasamband inn til bæði Vegin Langa og til Norðara ringvegin. Víst verður annars til tilmæli til omanfyri standandi pkt. 6.

8. **Íbinding við Villingadalsvegin**
   Villingadalsvegurin er lutfalsliga smalur, og trupult er at breiðka hann, orsakað av nógvari bygging á báðum síðum av vegnum. Harumframt er ikki pláss til at gera íbinding í Norðara ringvegin við rundkoyring, uttan at taka burtur verandi hús. Víst verður annars til tilmæli til omanfyri standandi pkt. 6.

9. **Støðutakan til tunnilsloysn við Villingadalsvegin**
   Tekniska umsitingin vísir á, at við tí vegalinju, sum nú er kend, eru tað ikki ferðslutekniskar orsøkir til at gera tunnil við Villingadalsvegin. Tekniska umsitingin staðfestir eisini, at tað eru ikki annarleiðis umhvørvislig atlit at taka á økinum við Krákugjógv enn aðrastaðni fram við landsvegnum, tá talan er um frástøðu frá bygdum øki, náttúruviðurskifti o.l. Tekniska umsitingin metir tí, at nyttuvirknaðurin av einum tunnli við Villingadalsvegin ikki svarar til ein meirkostnað á kr. 20-30 mió. í kommununar part, samsvarandi skrivi frá Føroya Landsstýri og eini leysligari kostnaðarmeting. Mælt verður tí frá at gera tunnil við Villingadalsvegin.

10. **Íbinding í verandi veganet undir Krákugjógv**

Loysnin í uppskotinum hjá Landsverk er ein planskyld íbinding við landsvegin, sum førir til eina rundkoyring á Norðara ringvegnum. Henda loysn tykist heldur kroyst og trupul á staðnum, og tekniska umsitingin ivast tí í, um hetta fer at virka nóg væl til at koyrandi fara at brúka hesa íbinding í so stóran mun, at tað fer at viðvirka til eina góða fordeiling av ferðsluni til og frá Norðara ringvegi. Tekniska umsitingin sær eisini hesa íbinding sum ein part av eini loysn viðv. Landsvegaføringini frá verandi íbinding millum Oyggjarvegin og Norðara ringveg niðan til Hotel Føroyar. (Sí pkt. 11)
Mælt verður tí til, at hildi verður fast um upprunaligu loysninga sum er, at gera eina íbinding við rundkoyring og so binda frákoyringina frá rundkoyringini í verandi vegin oman fyri P/F Wenzel Petersen.

11. **Oyggjarvegurin frá Hotel Føroyar til Norðara ringvegin**
    Landsvegurin er ætlaður at blíva bundin í verandi Oyggjarveg nakað vestan fyri P/F Wenzel Petersen. Oman fyri Hotel Føroyar fer landsvegurin síðani oman av verandi Oyggjarvegi. Henda vegaføring lýkur ikki tær ferðsluteknisku fyritreytirnar fyri einum 80 km vegi við nógvari ferðslu, sum Landsverk annars hevur lagt til grund fyri hesum nýggja landsvegnum sum heild.
    Mælt verður tí til, at á strekkinum frá har Landsverk hevur ætlanir um at gera eina planskylda íbinding undir Krákugjógv, til á leið har sum ætlanir eru um planskylda íbinding vestan fyri Hotel Føroyar, skal Landsverk gera 4-sporaðan tunnil í seinasta lagi tá ársmiðalferðslan fer upp um 20.000 bilar.

12. **Íbindingar á økinum við Hotel Føroyar**
    Tórshavnar kommuna tekur undir við, at økið vestan fyri Norðbil kann leggjast út til byggilendi, við serstøkum atkomuvegi, soleiðis sum prosjekterað av ráðgevunum hjá Landsverk. Tó er onki sum talar fyri at ferðslan til hetta økið gerst so stór, at neyðugt er við rundkoyring á verandi Oyggjarvegin. Tá talan er um íbinding oman móti býnum, verður mælt til at gera hesa við eini stórari rundkoyring heldur enn eini planskyldari íbinding. Nóg stórt øki skal tó leggjast av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera planskylda íbinding har um leiðir, um ársmiðalferðslan fer upp um 20.000 bilar og avgjørt verður at hækka mest loyvdu ferðina á strekkinum til 80 km/t (sí pkt. 1.)

13. **Vegaføring og íbinding í Velbastaðvegin**
    Tann av P/F HMP Consult teknaða loysnin við íbinding av landsvegnum í verandi landsveg úti í Havnardali, er ikki í samsvar við tað sum áður er teknað. Vegatekniskt er seinasta uppskotið nøktandi, men neyðugt er at fáa betur lýst hvat vegaføringin og íbindingarnar merkja fyri verandi bygging í økinum og fyri verandi vegir í økinum (Velbastaðvegur og vegin út í Havnardal).

14. **Støðutakan til verandi íbindingar við Oyggjarvegin**
    Norðbil, Brandstøðin og P/F Wenzel Petersen hava sum er íbinding í Oyggjarvegin, umframt at einstøk sethús á økinum eisini eru íbundin Oyggjarvegin.

Mælt verður til, at um Landsverk ætlar at niðurleggja verandi íbindingar, mugu teir útvega aðrar í staðin. Harumframt verður mælt til takað undir við, at økið vestan fyri Norðbil kann leggjast út til byggilendi, við serstøkum atkomuvegi, soleiðis sum prosjekterað av ráðgevunum hjá Landsverk. Tó er onki sum talar fyri, at ferðslan til hetta økið gerst so stór, at neyðugt er við rundkoyring á verandi Oyggjarvegin.

15. **Støðutakan til veitingar til el, vatn, kloakk og fjarhita**
Sambært upplýsingum sum tekniska umsitingin hevur fingið, hevur Landsverk ikki ætlanir um at gera fyrireikingar til at leggja leiðingar til el, vatn, kloakk og fjarhita í landsvegin.
Tekniska umsitingin metir, at tað er óhugsandi at hava ein høvuðsveg sum fer gjøgnum bygt økið, og sum er myrkur, sum ikki loftar yvirflatuvatnið og ikki tekur hædd fyri brandpostum o.l.
Mælt verður tí til at krav verður sett fram um, at tílíkar leiðingar skulu leggjast í vegin, eins og gjørt verður aðrastaðni har landsvegir fara gjøgnum bygt økið. Harumframt er ynskiligt, at fyrireikingar verða gjørdar til at fjarhitaleiðingar kunnu leggjast í vegkantin.
Víst verður annars á býráðssamtykt um reinskan av vegvatni j. nr. 2005-1437.

16. **Støðutakan til gonguteigar og súkklubreytir**
Mælt verður til, at ein tílíkur vegur gjøgnum bygt økið hevur gonguteigar og súkklubreytir, soleiðis at sleppast kann undan at gangandi og súkklandi – m.a. útlendsk ferðafólk – ganga og súkkla á koyribreytunum millum bygdir, soleiðis sum tey gera flestu staðni sum nú er. Stórt tal av ferðandi koma hvørt ár til Havnar og fara herfrá víðari kring landið.
Víst verður annars á býráðssamtykt um gonguteigar og súkklubreytir j. nr. 2005-1436.

17. **Støðutakan til byggilinju (frástøðu) frá landsvegnum**
Av tí at talan er um ein landsveg, sum fer ígjøgnum partvíst bygt økið, og økið sum í byggisamtyktini fyri Tórshavn er lagt av til byggilendi, metir tekniska umsitingin, at tað er ikki grundarlag fyri at áseta størri fjarstøðu enn 25 m frá vegmiðju til byggiljuna fram við landsvegnum. Tó verður mælt til, at tað í sambandi við byggilinjuna verður tikin hædd fyri teimum støðum, har íbindingar væntast at koma í framtíðini, sum antin rundkoyringar ella planskyldar íbindingar.

**Tekniska nevnd 13. desember 2006:** Málið tikið av skrá.

**Býráðið 14. desember 2006:** Tikið av skrá.

- Landsverk hevur hin 31. januar 2007 havt framløgu fyri byggi- og býarskipanarnevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini av vegaprojektinum um nýggjan landsveg frá Kaldbaksvegnum til Havnardal. Sama dag, gjøgnumgingu omanfyri nevndu faknevndir einkultu partarnar av málinum, og var hetta

framhald av tí nevndarviðgerð, sum frammanundan hevur verið í byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

Tilmæli hjá tekniska stjóranum, býarverkfrøðinginum og býararkitektinum fyri einstøku punktini er eftir henda fundin tillagað soleiðis:

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

1. **Vegakategori og framtíðar tillagingar av vegastrekkinum**
   Grundað á ferðsluframskrivingar verður mælt til at taka undir við, at vegurin verður fyrireikaður til ein 4-sporaðan veg til ferðslu við 80 km/t, og at **allur** vegurin horisontalt- og vertikalt verður tilevnaður út frá hesum fyritreytum.
   Mælt verður tó samstundis til:
   a) **at** á vegastekkinum frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar verður ferðin avmarkað til 50-60 km/t
   b) **at** íbindingarnar millum kommunala veganetið og landsvegin verða gjørdar sum vanligar T-kross íbindingar, so leingi ársmiðalferðslan ikki ger tað neyðugt at gera annað slag av íbindingum.
   c) **at** biðja Landsverk um ferðslutekniskar kanningar av hvat er hóskandi sum mest loyvda ferð á strekkinum, har vanligar T-íbindingar og/ella rundkoyringar verða, av tí at talan verður um bygt øki á báðum síðum av vegnum.
   d) **at** tá ársmiðalferðslan í framtíðini fer upp um 18.000 bilar um samdøgri, ella onnur ferðsluviðurskifti viðføra ónøktandi framkomiligheit, kann ferðin um neyðugt hækkast til 80 km/t, samstundis sum íbindingarnar kunnu endurskoðast, og støða takast til um vegurin skal gerast 4-sporaður.

2. **Íbinding við tunnil hjá P/F Skálafjarðartunnilin**

   Vísandi til §5, stk. 3, litra 6 í *Ll. Nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir*, og *Almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu* verður mælt til:
   a) **at** seta fram krav til P/F Skálafjarðartunnilin og Landsverk um at fáa tekningar og nærri upplýsingar, um hvussu veganetið á Kaldbaksvegnum og til havnina á Sundi verður broytt í sambandi við tunnilsverkætlanina hjá P/F Skálafjarðartunnilin, til góðkenningar.
   b) **at** seta fram krav til P/F Skálafjarðartunnilin og Landsverk um at fáa neyvar tekningar og upplýsingar um hvørjar kommunalar og privatar jarðarognir verða ávirkaðar av broytingunum av veganetinum á Kaldbaksvegnum og til havnina á Sundi.
3. **Íbinding/frákoyring við núverandi Hvítanesvegin**
   Mælt verður til:
   a) **at** biðja Landsverk um neyvar tekningar og frágreiðing, um hvussu íbindingin/frákoyring millum nýggja landsvegin og Hvítanesvegin verður gjørd, til góðkenningar.

4. **Íbinding við vinnuøkini Sandvíkahjalli, Skarðshjalli og Ovari Hjalli**
   Mælt verður til:
   a) **at** kommunan útvegar sær lendi til vinnuøkið á Ovara Hjalla umframt lendi til vegaatkomu frá Hvítanesvegnum niðan á Ovara Hjalla og lendi til gerð av rundkoyring við Hvítanesvegin.
   b) **at** kommunan letur gera útstykkingarætlan og tekniskt projekt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla
   c) **at** kommunan letur gera kanningar av íbinding í nýggja innkomuvegin, og leggur av lendi til antin íbinding við rundkoyring ella T-kross íbinding á økinum við Ovara Hjalla. Víst verður í hesum sambandi eisini til omanfyri standandi pkt. 1a.

5. **Planskyld íbinding við Stórutjørn**
   Mælt verður til:
   a) **at** takað undir við uppskotinum hjá Landsverk um at gera planskylda íbinding við Stórutjørn, vísandi til væntandi nógva ferðslu og virksemi á hesum øki.
   b) **at** samráðingar verða tiknar upp við Landsverk um allar íbindingar, og útreiðlsubýtið í sambandi við hesar.

6. **Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn**
   Sambært upprunaligu linjuføringini, sum Tórshavnar kommuna ikki hevur fingið til ummælis, kom landsvegurin at ganga gjøgnum tjørnirnar á økinum. Samstundis hava interessentar í økinum sett fram ynski um at fáa landsvegalinjuna flutta 50 m longur vestur – tvs. burtur frá Stórutjørn. Onki er til hindurs fyri hesum.
   Tí verður mælt til:
   a) **at** landsvegurin verður fluttur 50 m longur vestur á økinum við Stórutjørn.
   b) **at** nýggi sambindingarvegurin verður longdur tilsvarandi 50 m.
   c) **at** kostnaðurin fyri arbeiðið verður at rinda av interessentunum, sum ynskja flyting av vegnum.

7. **Íbinding við Flatarvegin, Sundvegin og Villingardalsvegin**
   Tað verður mett serstakliga umráðandi, at tað á vegastrekkinum frá Stórutjørn til Oyggjavegin verða tikin atlit til verandi kommunala veganet, og hvussu ferðslan av landsvegnum verður fordeild eftir verandi vegum inn til Vegin Langa og haðani víðari til Norðara ringvegin. Hetta fyri at høvuðsstaðurin eisini kann fáa veruliga nyttu av nýggja landsvegnum. Á hesum grundarlagi verður mælt til:
   a) **at** fram til 2010, tá hesin parturin av landsvegnum eftir ætlanunum hjá Landsverk verður liðugur, verða Flatavegur, Sundsvegur og Villingardalsvegur bundnir í landsvegin beinanvegin og at teir partar av vegnum sum eru lidnir, sostatt verða nýttir beinanvegin.
   b) **at** fyri tíðarskeiðið aftan á 2010 skulu minst 2 av teimum 3 verandi vegunum á staðnum – t.e. Flatarvegurin, Sundsvegurin og Villingardalsvegurin, verða íbundnir landsvegin við vanligum T-kross íbindingum, so leingi ársmiðalferðslan ikki ger tað neyðugt at gera annað slag av íbindingum.

c) **at** nóg stórt øki skal verður lagt av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera ferðslutekniskt hóskandi íbindingar har um leiðir, tá ársmiðalferðslan fer upp um 18.000 bilar ella um onnur ferðsluviðurskifti gera tað neyðugt, so sum ónøktandi framkomiligheit o.l.
d) **at** samráðingar verða tiknar upp við Landsverk um allar íbindingar og útreiðlsubýtið í sambandi við hesar.

**8. Tunnilsloysnir við Villingardalsvegin**

Tekniska umsitingin vísir á, at við tí vegalinju, sum nú er kend, eru tað ikki ferðslutekniskar orsøkir til at gera tunnil við Villingardalsvegin. Tekniska umsitingin staðfestir eisini, at tað eru ikki annarleiðis umhvørvislig atlit at taka á økinum við Krákugjógv enn aðrastaðni fram við landsvegnum, tá talan er um frástøðu frá bygdum øki, náttúruviðurskifti o.l. Hetta er m.a. grundað á simuleringar av óljóði frá landsvegnum, sum Landsverk hevur latið gera, og hevur lagt fram fyri limirnar í byggi- og býarskipanarnevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini. Tekniska umsitingin metir tí, at nyttuvirknaðurin av einum tunnli einans við ovasta part av Villingardalsvegnum ikki svarar til ein meirkostnað á kr. 20-30 mió. í kommununar part, samsvarandi skrivi frá Føroya landsstýri og eini leysligari kostnaðarmeting. Á hesum grundarlagi verður mælt til:
a) **ikki** at gera tunnil bert við ovara part av Villingardalsvegnum.
b) **at** Landsverk verður biðið um at gera skitsuuppskot, kostnaðarmeting og kost-nyttu kanning av at gera ein longri tunnil líka frá ovara parti av Villingardalsvegnum vestureftir undir Húsareyn, sum kemur útaftur vestan fyri Hotel Føroyar.
c) **at** samráðingar verða tiknar upp við Landsverk um útreiðslubýtið.

**9. Íbinding í verandi veganet undir Krákugjógv**

Tann 2-sporaða fyribilsloysnin hjá Landsverk við íbinding beinleiðis í vegin oman fyri P/F Wenzel Petersen verður als ikki mett nøktandi, tí hon verður ikki mett at beina ferðsluna inn á Norðara ringveg/Marknagilsvegin á ein tryggan og forsvarligan hátt.
Tann 4-sporaða framtíðarloysnin í uppskotinum hjá Landsverk, tá ársmiðalferðslan fer upp um 18.000 bilar, er ein planskyld íbinding við landsvegin, sum førir til eina rundkoyring á Norðara ringvegnum. Henda loysn tykist heldur kroyst og trupul á staðnum, og tekniska umsitingin ivast tí í, um hetta fer at virka nóg væl til at koyrandi fara at brúka hesa íbinding í so stóran mun, at tað fer at viðvirka til eina góða fordeiling av ferðsluni til og frá Norðara ringvegi.
Á hesum grundarlagi verður mælt til:
a) **at** tá talan er um fyribilsloysnina við 2-sporaða vegnum, verður hildið fast um upprunaligu loysnina, sum er at gera eina íbinding við rundkoyring, og so binda frákoyringina frá rundkoyringini í verandi vegin oman fyri P/F Wenzel Petersen.
b) **at** tá talan er um 4-sporaðu framtíðarloysnina, verður í fyrsta lagi víst til tilmæli til pkt. 8.b um at gera ein tunnil líka frá endanum á Villingardalsvegnum til ætlaðu vegaflættingarnar vestan fyri Hotel Føroyar..

c) **í øðrum lagi** verður mælt til at Landsverk, í samstarvi við kommununa, verður biðin um at gera skitsuuppskot, kostnaðarmeting og kost-nyttu kanning av at gera ein styttri tunnil uml. frá st. 6800 til ætlaðu vegaflættingarnar vestan fyri Hotel Føroyar. Hetta tilmæli er grundað á ferðslutekniskar orsøkir, og eigur tí at verða rindað til fulnar av landinum. Landið vil við hesum samstundis spara útreiðslur til ognartøkur, óljóðsverju o.a. á hesi leiðini, eins og tað slepst undan trupulleikanum við verandi íbindingum í Landsvegin við Brandstøðina, P/F Norðbil, P/F Wenzel Petersen og sethús á umrødda vegastrekki.

d) **at** gjørdar verða kanningar av hvørt Villingardalsvegurin ella ein nýggjur sambindingarvegur millum innkomuvegin og innara ringveg skal gerast fyri at binda saman hesar vegir, um tunnil verður gjørdur jbr. pk.t 9c ella 9d.

**10. Oyggjarvegurin frá Hotel Føroyar til Norðara ringvegin**

Tekniska umsitingin metir, at vegaføringin frá P/F Wenzel Petersen til íbindingarnar vestan fyri Hotel Føroyar, lýkur ikki tær ferðslutekniskur fyritreytirnar fyri einum 80 km vegi við nógvari ferðslu, sum Landsverk annars hevur lagt til grund fyri hesum nýggja landsvegnum sum heild á øðrum strekkjum. Tí verður mælt til:

a) **í fyrsta lagi** at Landsverk ger ein longri tunnil jbr. tilmælinum til omanfyri standandi pkt. 8.b.

b) **í øðrum lagi** at Landsverk ger ein styttri tunnil jbr. tilmælinum til omanfyri standandi pkt. 9.c.

c) **at** kommunan, sum avleiðing av aðrari av tunnilsloysnunum, yvirtekur landsvegastrekkið frá Hotel Føroyum oman til P/F Wenzel Petersen.

**11. Vegasamankomingar á økinum vestan fyri Hotel Føroyar**

Mælt verður til:

a) **at** taka undir við at økið vestan fyri Norðbil kann leggjast út til byggilendi, við serstøkum atkomuvegi, nøkulunda soleiðis sum projekterað av ráðgevunum hjá Landsverk.

b) **at** taka upp samráðingar við Landsstýrið/Fiskimálaráðið um keyp av lendi burtur av "antennuøkinum", matr. nr. 1231.

c) **ikki** at gera rundkoyring, men vanliga T-kross íbinding, har núverandi Oyggjarvegurin verður bundin í nýggja landsvegin, grundað við at onki er sum talar fyri, at ferðslan til hetta økið gerst so stór, at neyðugt er við rundkoyring við henda vegkross.

d) **at** nýggj íbinding oman móti býnum verður gjørd við eini stórari rundkoyring heldur enn eini planskyldari íbinding.

e) **at** nóg stórt øki tó verður lagt av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera planskylda íbinding har um leiðir, seinast tá ársmiðalferðslan fer upp um 18.000.

**12. Vegaføring og íbinding í Velbastaðvegin**

Mælt verður til:

a) **fyribils at** taka undir við uppskotinum hjá Landsverk til vegaføring í Havnardali og íbinding í Velbastaðvegin, sum tekniska umsitingin metir vegatekniskt at verða nøktandi.

b) **at** biðja Landsverk um neyvari upplýsingar um hvat vegaføringin og íbindingarnar merkja fyri verandi bygging og vegir í økinum (Velbastaðvegin og vegin út í Havnadal), og somuleiðis fyri framtíðar møguleikarnar fyri bygging og vegum í økinum, áðrenn endalig góðkenning verður givin.

**13. Støðutakan til verandi íbindingar við Oyggjarvegin**

Norðbil, Brandstøðin og P/F Wenzel Petersen hava sum er íbinding í Oyggjarvegin, umframt at einstøk sethús á økinum eisini eru íbundin Oyggjarvegin.

Mælt verður til:

a) **at** tunnil verður gjørdur jbr. tilmælinum til omanfyri standandi pkt. 8.b. ella pkt. 9.c., og at kommunan sum avleiðing av hesum yvirtekur landsvegastrekkið frá Hotel Føroyum oman til P/F Wenzel Petersen, sum so verður kommunalur vegur, jbr. pkt. 10.c.

b) **at** uttan mun til um vegurin verður verandi landsvegur ella verður kommunalur vegur, má avvarðandi eigari av vegnum útvega nýggjar íbindingar fyri allar tær verandi íbindingarnar, sum verða burturbeindar ella fluttar.

**14. Støðutakan til veitingar til el, vatn, kloakk og fjarhita**

Sambært upplýsingum, sum tekniska umsitingin hevur fingið, hevur Landsverk ikki ætlanir um at gera fyrireikingar til at leggja leiðingar til el, vatn, kloakk og fjarhita í landsvegin.

Tekniska umsitingin metir, at tað er óhugsandi at hava ein høvuðsveg, sum fer gjøgnum bygt øki, og sum er myrkur, sum ikki loftar yvirflatuvatninum og ikki tekur hædd fyri brandpostum o.l.

Mælt verður til:

a) **at** krav verður sett fram um, at tílíkar leiðingar skulu leggjast í vegin, eins og gjørt verður aðrastaðni, har landsvegir fara gjøgnum bygt øki, og at samráðingar verða við Landsverk um útreiðslubýtið í hesum sambandi.

b) **at** krav verður sett Landsverk um burturbeining og reinskan av vegvatni, jbr. býráðssamtykt, j. nr. 2005-1437.

c) **at** gera avtalu við Landsverk um at fyrireikingar verða gjørdar til at fjarhitaleiðingar kunnu leggjast í vegkantin.

**15. Støðutakan til gonguteigar og súkklubreytir**

Vísandi til krøv um ferðslutrygd fyri ein slíkan veg, sum fer gjøgnum bygt øki fyri bæði gangandi og súkklandi fólk, verður mælt til:

a) **at** Landsverk letur gera gonguteigar og súkklubreytir, jbr. býráðssamtykt um gonguteigar og súkklubreytir j. nr. 2005-1436.

b) **at** hámarksferðin fyri vegastekkið frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar, verður samsvarandi omanfyri standandi pkt. 1.c

**16. Støðutakan til byggilinju (frástøðu) frá landsvegnum**

Mælt verður til:

a) **at** gera avtalu við Landsverk um eina byggilinju fram við Landsvegnum, sum liggur í eini fjarstøðu á 25 m frá vegmiðju, á øllum vegastrekkinum, roknað út frá einum 4-sporaðum vegi. Tó verður mælt til at tað í sambandi við byggilinjuna í samráð við Landsverk verður tikin hædd fyri størri fjarstøðu á teimum støðum, har størri íbindingar væntast at koma í framtíðini.

**17. Verja móti óljóði**

Vísandi til pkt. 16 er umráðandi at tað, har nýggi landsvegurin fer gjøgnum býin, ikki koma at liggja stór øki á báðum síðum, sum verða ónýtilig til bygging. Tað eigur at kunna byggjast í øllum førum so nær sum 25 m frá vegmiðju, roknað út frá einum 4-sporaðum vegi. Tí verður mælt til:

a) **at** krav verður sett Landsverk um at verja móti óljóði eigur at verða gjørd fram við vegnum allan vegin frá Kaldbaksvegnum til Havnardal, har lendisviðurskiftini ikki loysa trupulleikan við óljóði við støði í hámarksferðini á vegastrekkinum, jbr. frammanfyri standandi pkt. 1a, og við støði í at óljóð skal verða max 55 dB í eini frástøðu á 15-20 m frá vegmiðju.

b) **at** byggimyndugleikin – t.e. Tórshavnar kommuna – skal góðkenna slíkar ljóðverjur við atliti til útsjónd, tilfar o.a., og at ljóðverjan í minst møguligan mun skal taka burtur útsýnið og møguleikarnar fyri orientering hjá bilførarunum.

**18. Byggimálsviðgerð og avtala við Landsverk.**

Mælt verður til:

a) **at** fráboða Landsverk, at vegurin skal viðgerast og hava loyvi frá Tórshavnar kommunu, sum byggimyndugleiki, sambært *Ll. Nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir*, §5, stk. 3, litra 6 og sambært *K. Nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.*

b) **at** vísa Landsverk á býráðssamtykt um gonguteigar og súkklubreytir j. nr. 2005-1436 og á býráðssamtykt um reinskan av vegvatni j. nr. 2005-1437.

c) **at** gera avtalu við Landsverk um fyribils íbindingar, endaligar íbindingar, projektbroytingar, býtislykil fyri ávísar útreiðslur o.a.

**19. Tíðarætlan og raðfylgja.**

Mælt verður til:

a) **at** taka undir við ætlanini hjá Landsverk at gera vegin lidnan til 2010.

b) **at** gera avtalu við Landsverk um í fyrstu atløgu at arbeiða norðureftir frá har vegurin nú er, og so samstundis at gera tær kanningar v.m. viðv. vegaføringini frá har vegaarbeiðið er komið til nú við endan á Villingardalsvegnum til Oyggjarvegin, vísandi til omanfyri standandi tilmæli í punktunum 7, 8, 9, 10, 11, 12 og 13, og at framhaldið av arbeiðinum suðureftir verður tikið uppaftur, tá nevndu viðurskifti eru loyst.

c) **at** Landsverk og Tórshavnar kommuna í felag arbeiða við at lýsa og loysa omanfyri nevndu viðurskifti, at leggja fyri til endaliga góðkenning seinast 1. desember 2007.

**20. Ferðslutrygdarmeting**

Mælt verður til:

d) **at** projektið viðv. nýggja innkomuvegnum, íbindingar í kommunala veganetið, og fordeilingin av ferðslu frá innkomuvegnum inn á kommunala veganetið, verður latið serkønum at meta um, serliga við atliti til ferðslutrygd.

**Tekniska nevnd 23. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum við hesum viðmerkingum:

- Viðv. pkt. 7.b vil ein minniluti, Høgni Mikkelsen, hava at allir tríggir verandi vegir á staðnum skulu bindast í landsvegin.
- Nevndin varð samd um at strika pkt. 8.c.
- Ein minniluti, Katrin Dahl Jakobsen og Høgni Mikkelsen, mælir til at kanna vegagerð upp á Húsareyn eisini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juni. 2007:** Nevndin viðgjørdi og samtykti at taka undir við tilmælunum til hesi puntk: pkt. 4 a og b, pkt. 6, pkt. 11 a og b, pkt. 12 b, pkt. 14 a, pkt 16, pkt 17 a, og b og pkt. 18 a.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini.

Viðv. pkt. 7b mælir ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen, til at allir tríggir vegirnir skulu bindast í landsvegin.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til at kanna vegagerð upp á Húsareyn eisini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Høgna Mikkelsen og Jan Christiansen í fíggjarnevndini, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov og Annika Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Bjarti Mohr.

Síðan varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Høgna Mikkelsen í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 5 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Katrin Dahl Jacobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen og Høgni Mikkelsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

At enda varð samtyktin í fíggjarnevndini einmælt samtykt.

**116/07** **2007-1909**

**Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Regulering av A3 og D2 økinum við Stórutjørn.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið við Stórtjørn, er neyðugt at regulera almennu byggisamtyktina fyri hetta økið samsvarandi.

Økið sum serstaka byggisamtyktin fyri Stórutjørn fevnir um, er í verandi almennu byggisamtyktini størsta mun A3 og D2, men ein partur liggur tó í 4. grundumráði.

Endamálið við hesi broytingini av almennu byggisamtyktini er at regulera økini soleiðis, at økini har vinnu- og bústaðarøkini verða skipað í serstøku byggisamtyktini verður A3-øki og har frítíðar- og ítróttarendamál verður skipað, verður D2-øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til broyting av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu sambært kortskjølum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:45**

| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**21. juni 2007** | Blað nr.: **9060**<br>Formansins merki: |

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |